# AGENDA 21

– ein ætlan fyri burðardygga menning

# Agenda 21

- ein ætlan fyri burðardygga menning

2004 - 1

Mál nr.: 7-200300304-5

Umseting: í/f Kind
Dagføring: Lena Lastein og Jóhanna Olsen
Útgevari: Heilsufrøðiliga starvsstovan
Prent: Einars Prent

ISBN 99918-967-9-1

1. FORMÆLI .......... 5

2. VEGURIN TIL RIO .......... 7

3. AGENDA 21 – EIN VIRKISÆTLAN .......... 9

4. SAMFELAGSLIG OG FÍGGJARLIG VIÐURSKIFTI .......... 11
4.1 Altjóða samstarv .......... 11
4.2 Fátækt .......... 12
4.3 Nýtsla .......... 14
4.4 Fólkavøkstur .......... 15
4.5 Heilsa .......... 16
4.6 Búseting .......... 18
4.7 Avgerðir um burðardygga menning .......... 19

5. TILFEINGISVERJA OG TILFEINGISUMSITING .......... 21
5.1 Verja av lofthavinum .......... 21
5.2 Burðardygg jarðarnýtsla .......... 23
5.3 Skógartýning .......... 24
5.4 Oyðimerkur .......... 25
5.5 Burðardygg menning av fjallalendi .......... 26
5.6 Burðardyggur landbúnaður .......... 27
5.7 Varveitan av lívfjølbroytni .......... 29
5.8 Lívtøkni .......... 30
5.9 Fyrisiting og verja av høvunum .......... 31
5.10 Fyrisiting og verja av vatntilfeingi .......... 33
5.11 Trygg nýtsla av eiturevnum .......... 35
5.12 Fyrisiting av vandamiklum burturkasti .......... 36
5.13 Fyrisiting av burturkasti og spillivatni .......... 37
5.14 Fyrisiting av geislavirknum burturkasti .......... 38

6. UMRÁÐANDI SAMSTARVSFELAGAR .......... 41
6.1 Leikluturin hjá kvinnunum í burðardyggu menningini .......... 41
6.2 Leilutur hjá børnum og ungum í burðardyggu menningini .......... 43
6.3 Leikluturin hjá upprunafólkinum .......... 44
6.4 Samstarv við sjálvbodnum felagsskapum (NGO) .......... 45
6.5 Økismyndugleikar .......... 46
6.6 Verkafólk og verkafeløg .......... 46
6.7 Handil og vinnulív .......... 47
6.8 Granskarar og tøknifrøðingar .......... 48
6.9 Leikluturin hjá bóndum .......... 49

7. ÍVERKSETING ........ 51
  7.1 Fígging av burðardyggu menningini ........ 51
  7.2 Flutningur av tøkni ........ 52
  7.3 Vísindi og burðardygg menning ........ 53
  7.4 Útbúgving og alment tilvit ........ 53
  7.5 Grundarlagið undir burðardyggari menning ........ 55
  7.6 Fyriskipan av burðardyggari menning ........ 55
  7.7 Altjóða lóggáva ........ 56
  7.8 Upplýsing til avgerðartakarar ........ 57
  7.9 Rio-yvirlýsingin um menning og umhvørvi ........ 58
  7.10 Rio-yvirlýsingin um skógarvinnu ........ 60
  7.11 Millumtjóða veðurlagssáttmálin ........ 61
  7.12 Millumtjóða sáttmálin um lívfjølbroytni ........ 63

8. AFTANÁ RIO ........ 65

9. DATA-KELDUR ........ 67

10. ORÐALISTI ........ 69

# 1. FORMÆLI

Agenda 21 er eitt av meginskjølunum frá heimsráðstevnuni í Rio de Janeiro í 1992. Hetta er ein arbeiðsætlan fyri 21. øld har dentur er lagdur á heimsins stóru menningar- og umhvørvistrupulleikar og ta felags ábyrgd vit hava at finna loysnir.

Í mun til nógvar aðrar altjóða sáttmálar, er Agenda 21 ikki løgfrøðiliga bindandi. Tað er hinvegin eitt skjal sum heitir á øll lond um eftir egnum fortreyt at gera sítt til, at fáa eina burðardygga menning. Agenda 21 skilir seg eisini út við at vísa á, at allir samfelagsbólkar mugu luttaka í arbeiðinum at fyribyrgja og loysa teir umhvørvis- og menningartrupulleikar, sum heimurin stendur í.

Hugtakið *hugsa globalt – handla lokalt* er ofta at hoyra í samband við Agenda 21 og sipar til, at vit eiga øll at vera varug við, at okkara avgerðir í tí dagliga hava alheimslig árin. Um vit t.d. í tí dagliga eru ansin og endurnýta, spara vit ikki bert pening, men vit spara eisini uppá virðismikið tilfeingi í náttúruni.

Ætlanin fyri 21. øld byggir á hugtakið um burðardygga menning. Burðardygg menning merkir í stuttum ein menning, har tørvurin hjá teimum menniskjum, sum í dag búleikast her á jørð, kann nøktast uttan at hetta minkar um møguleikanir hjá komandi ættarliðum eisini at nøkta sín tørv.

Hesin bóklingur er ein stutt lýsing av høvuðsinnihaldinum í Agenda 21 arbeiðsætlanini. Bóklingurin er ein føroyska útgáva av kunningartilfari sum frammanundan er útgivið í fleiri av norðurlondunum, sum *Agenda 21 – en dagorden for bæredygtig udvikling,* upprunaliga løgd til rættis av Michel Keating fyri Centre for Our Common Future. Uppruna útgávan er skriva stutt eftir ráðstevnuna í 1992. Umsetingini hevur í/f Kind staðið fyri. Lena Lastein og Jóhanna Olsen á Heilsufrøðiligu starvsstovuni hava gjørt neyðugar dagføringar í myndum og teksti. Landstýrismaðurin í Umhvørvismálum hevur veitt fíggjarligan stuðul til útgávuna.

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur staðið fyri fleiri verkætlanum innan Agenda 21, m.a. arbeiðnum við kommunalum umhvørvis-ætlanum: *Plan for miljøet i kommunerne*, TemaNord 1997:576, útgivin av Norðurlendska Ráðharraráðnum, og *Uppkast til føroyska ætlan um burðadygga menning. Ár 2002 – 2020,* útgivin í januar 2002 av Heilsufrøðiligu starvsstovuni. *Lokal Agenda 21 – Idékatalog*, útgivin av Norðurlendska Ráðharraráðnum, ANP 2003:758, er júst løgd á heimasíðuna hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni www.hfs.fo

Tað er okkara vón at henda frágreiðing um Agenda 21 kann skapa øktan áhuga fyri umhvørvis- og menningarviðurskiftum og kann nýtast sum undirvísingartilfar, sum kjakupplegg og sum støðið undir ítøkiligum virksemi.

Umhvørvisdeildin
Jacob P. Joensen

# 2. VEGURIN TIL RIO

Seinastu tríati árini er vorðið alt greiðari, at vit fáa ikki góð samfeløg og góðar búskapir, um heimurin skal vera so merktur av fátækt og umhvørvistýning, sum hann er. Búskapargongdin kann ikki steðgast, men vit eiga at broyta hana, so at hon fer betur við umhvørvinum. Avbjóðingin er at fremja hesa fatan í verki og at skapa burðardygga menning og lívsstíl

Ein leiðin at ganga er ætlanarlýst í Agenda 21. Hetta skjal er sum ein vegvísi inn í 21. øld fyri politiskar leiðarar, vinnulív og hvønn einstakan okkara. Semja fekst um Agendu 21 á ST-ráðstevnuni um menning og umhvørvið, UNCED[1], í brasilska høvuðsstaðnum Rio í 1992. Rioráðstevnan, sum hon verður kallað, var størsta stevna nakrantíð fyri politiskar leiðarar, tí her hittust statsleiðarar og stjórnarumboð fyri 179 lond. Harafturat vóru samankomin mong hundrað umboð fyri ST, økismyndugleikar, privatar felagsskapir, vinnulív og onnur.

Samstundis sum ráðstevnan varð hildin varð eisini skipað fyri einum heimstorgi, har 18.000 fólk úr 166 londum skipaðu fyri fundum, fyrilestrum og átøkum fyri 400.000 vitjandi. 8.000 tíðindafólk bóru frásagnir um hesi tiltøk um allan heim.

Støðið undir Rioráðstevnuni varð lagt í 1972, tá ið 113 lond hittust í Stokkhólmi til fyrstu alheims umhvørvisráðstevnuna. Í 1983 stovnaði ST so Heimsnevndina fyri Menning og Umhvørvi (Brundtlandsnevndin), WCED. Fýra ár seinni kom frágreiðingin ”Felags framtíð okkara[2]“ (Brundtlandsfrágreiðingin), sum var eitt endaligt skjal frá nevndini. Henda frágreiðing gjørdi púra greitt, at leggja vit ikki á annan bógv í lívshátti, nýtslu og handli okkara, so verða avleiðingarnar øgiligar fyri fólk og umhvørvi.

Í 1989 fór ST at fyrireika ráðstevnu um menning og umhvørvi. Endamálið var at leggja eina ætlan fyri, hvussu vit gera menningina burðardygga. Í tvey ár evnaðu ymsir serfrøðingar einstøku avtalurnar til. Fleiri túsund fólk og felagsskapir gjørdu sítt til, at tiltakið skuldi eydnast.

Rioráðstevnan førdi til tvær grundleggjandi yvirlýsingar, tveir millumtjóðasáttmálar og eina skrá fyri burðardygga menning um allan heim. Tað er henda skrá, ið verður nevnd Agenda 21.

Tey fimm skjølini eru:

1. Agenda 21, sum er eitt avtaluverk um, hvussu vit fáa burðardygga menning - samfelagsliga, búskaparliga og umhvørvisliga.

2. Riokunngerðin um menning og umhvørvi, ið við 27 grundreglum lýsir rættindi og skyldur hjá øllum tjóðum í arbeiði teirra við menning og vælferð.

3. Riokunngerðin um skógarvinnu.

4. Veðurlagssáttmálin, sum skal tryggja, at vakstrarhúsgassini í lofthavinum ikki broyta heimsveðurlagið.

5. Sáttmálin um lívfjølbroytni[3], sum skal tryggja, at tjóðirnar fara væl um lívfjølbroytnið, og at virðini á tí verða javnt býtt.

[1] United Nations Conference on Environment and Development

[2] enska heitið er “Our Common Future”

[3] tað, at nógv ymiskt lív er í náttúruni

# 3. AGENDA 21 – EIN VIRKISÆTLAN

Mannaættin stendur við eitt søguligt vegamót. Heimurin er merktur av vaksandi fátækt, svongd, sjúku og analfabetismu. Munurin millum rík og fátæk veksur, og lívsneyðugar vistskipanir verða alsamt týndar. Vit mugu síggja umhvørvi og menning í samanhangi, og vit mugu royna at vinna á vansunum við fyriliti fyri báðum lutum. Hetta er einasti vegur at fylgjast inn í eina betri framtíð.

Vit mugu nøkta grundleggjandi tørvir, betra um lívskorini hjá øllum og verja vistskipanir. Einki land ger hetta einsamalt, men saman megna vit tað – í einum heimssamstarvi fyri burðardyggari menning. Agenda 21, sum varð samtykt á ráðstevnuni í Rio de Janeiro í 1992, vísir eina altjóða semju og skyldu til samstarv um umhvørvi og menning á hægsta, politiska stigi.

Agenda 21 er um dagsins trupulleikar og framtíðarinnar avbjóðingar. Agenda 21 staðfestir, at tað stendur mest til stjórnirnar at fremja menningina, og hvørt land má leggja neyvar ætlanir og vísa politisk avrik. Avrikini hjá londunum mugu eisini verða samskipað og samanknýtt við altjóða samstarvi, t.d. ígjøgnum ST. Stjórnir mugu eisini eggja fólki sínum til, og tær mugu hava áhugafelagsskapir og aðrar bólkar við í arbeiði sínum.

Til at røkka málunum í Agendu 21 mugu fátækralond fáa alnógvan stuðul at gjalda tað, sum tað kostar at fáa eitt betri heimsumhvørvi. Neyðugt er eisini at játta altjóða stovnum pening til at fremja tilmælini í Agendu 21 í verki. Vit eiga eisini at hugsa um tey lond, hvørs búskapur er fyri stórum broytingum – t.d. eystanlond og tey í gamla Sovjetsamveldinum.

# 4. SAMFELAGSLIG OG FÍGGJARLIG VIÐURSKIFTI

## 4.1 Altjóða samstarv

Samstarv millum heimsins lond er týdningarmikil um fíggjarstøðan í heiminum skal verða virkin og javnmett.

Altjóða handil, ið fremur eitt hóskandi býti av heimsins framleiðslu, kann styðja upp undir slíka menning, um hann verður skipaður eftir góðum umhvørvisreglum.

Heimshandilin skal loyva virknum framleiðarum – serliga í fátækralondum – at marknaðarføra vørur sínar væl. Vinna fátækralond meiri pening við útflutningi, so verða ráðini til burðardygga menning eisini betri.

Mong fátækralond fingu nógv minni fyri útflutningsvørur sínar í 1980-árunum, av tí prísirnir á vørum fullu nógv á heimsmarknaðinum. Tá fingu summir kappingarneytar teirra almennan stuðul. Framleiðarar og brúkarar mugu semjast um fastar og hóskiligar prísir á t.d. kakao, kaffi, sukri og tropuviði.

Inntøkumissur og stór uttanlandsskuld gera, at mangt fátækraland fær at kalla ikki sett pening í burðargóða menning. Tey seinastu árini hava fleira fátækralond goldi meira í avgjøldum til ídnaðarlond enn útflutningsvirðið og móttikin menningarhjálp tilsamans.

Tað er alneyðugt hjá fátækralondum við íløgum, sum kunnu stimbra fíggjarvøkstur teirra og nøkta grundleggjandi tørvin hjá fólkinum á ráðiligan hátt. Fátækralond eiga at samstarva meira sínámillum um fíggjarligar menningarætlanir.

Seinastu tjúgu árini hava nógv fátækralond skyldað útlondum nógv meira, enn tey hava fingið burtur úr útflutningi og hjálparpeningi tilsamans. Tey hava tí noyðst at minkað um innflutning, íløgur og nýtslu, og ilt hevur verið at barst ímóti fátækini. Hjá summum hevur fíggjarneyðin havt við sær, at skarvað hevur verið av játtanum til heilsu, útbúgving og umhvørvisvernd. Okkurt fátækraland er tí komið í fíggjarligt óføri við vaksandi samfelagsligum og umhvørvisligum trupulleikum.




Ein altjóða ætlan er neyðug at venda gongdini. Heimurin má:

* Stuðla fríum handli og stegða vinnuverjuni, t.d. einvegis handilsforðingum, ið skaða fátækralond.

* Minka um stuðulsskipanir, sum elva til ójavna kapping.

* Tryggja, at umhvørvis- og handilspolitikkur stimbrar burðadyggari menning.

* Tryggja, at umhvørvisskipanir, herímillum heilsu- og trygdarskipanir, ikki tilvildarliga ella órættvíst verða nýttar at gera mismun á londum, ella verða nýttar sum loyniligar handilsforðingar.

* Tryggja, at tað almenna er við at leggja til rættis, samráðast um og fremja handilspolitikk.

Ætlanin eigur at fevna um útlendskar íløgur, heimførdan pening úr fátækralondum og gagnliga tilfeingisnýtslu. Heimurin má veita fíggjarhjálp og fáa greiðu á, hvussu minkað verður um uttanlandsskuldina hjá fátækralondum – serliga teimum, sum eru ringast fyri.

Heimurin má bjóða fátækralondum hjálp at umsita búskap og náttúrutilfeingi væl. Marknaðarkreftir, sum t.d. rentur og kursir, mugu vera støðugar. Í øllum londum skulu vøruprísir endurspegla tað, sum tað kostar at gera og burturbeina vørurnar umhvørvisliga og samfelagsliga.

Fyri at eggja til íløgur mugu øll lond steðga mutri og tryggja eina munagóða, reiðiliga, líkaverdiga og lønandi almenna umsiting. Rættindi og møguleikar hjá hvørjum einstøkum landi mugu eisini verða tryggjað. Øll lond mugu vissa sær støðugar prísir, álítandi kursir, munagóðar skattaskipanir, og serliga mugu tey stimbra privata vinnulívið.

## 4.2 Fátækt

Fátækt hevur so mangar orsøkir, at ilt er at greiða øll fátækramál í øllum londum. Hvørt land má tí hava sína arbeiðsskrá í stríðnum ímóti fátækt, svongd, analfabetismu, tvørrandi heilsuskipan, barnaumsorgan, arbeiðsloysi og ovfólkan. Hvør stjórn má fáa stuðul til tiltøk síni, tí stríðið ímóti fátækt er felags ábyrgd hjá okkum øllum. ST og limalondini mugu seta stríðið ímóti fátækt ovast á dagsskrá sína.




Endamálið við tiltøkum ímóti fátækni er at geva fólki møguleika at lívbjarga sær á einum burðadyggum støði. Fátækum nýtist at verða sjálvbjargnari - heldur enn at líta á menningarhjálp og matvøruhjálp. Neyðugt er at menna búskapin í fátækralondum fyri at útvega arbeiði, bæði til arbeiðsleys og við tí vaksandi fólkatalinum í huga.

Skulu menningarætlanir muna í longdini, mugu vit varðveita tilfeingið. Í menningarpolitikki, har heldur verður hugsað um nógva enn um varandi framleiðslu, gerst endin fyrr ella seinni, at framleiðsluorkan minkar. Hetta kann vaksa um fátæktina.

Ein vegur hjá stjórnum at ganga er at lata bólkum og kvinnum á staðnum meiri ábyrgd og meiri tilfeingi. Sjálvbodnir felagsskapir og kvinnufeløg eru t.d. umráðandi keldur til íblástur og virkisfýsni, og hava mangan sýnt góð evni at útvega nýggj og trygg arbeiðspláss.

Heimafólkið má vera við í arbeiðinum at umsita og verja náttúrutilfeingið. Tað má eisini kunna nýta tað og hava so mikið av peningi, at tað fær gjørt eitt munagott arbeiði. Heimafólkinum nýtist at fáa part av vinninginum av egnum náttúrutilfeingi. Mongum tørvar eisini lærdóm í skilvísari menning fyri at kunna avrika meira. Hetta gerst við økisskúlum, ið eru skipaðir í netverk, so at økissamfeløg kunnu læra hvørt av øðrum.

Sumstaðni í heiminum er alstórur tørvur á burðaravmarking. Kvinnur og menn hava tørv á somu rættindum til sjálvi at gera av, nær og hvussu nógv børn, tey vilja hava. Skulu tey fremja henda rætt sín, tørvar teimum upplýsing, útbúgving og pening. Stjórnir eiga tí at skipa fyri heilsuskráum og hjálparmøguleikum við tryggum og góðum føðistovum, sum kvinnur standa fyri. Stjórnir eiga eisini at skipa fyri ódýrum og lættfingnum hentleikum til ábyrgdarfulla burðaravmarking. Kvinnur eiga at fáa høvi at hava børn síni nóg leingi á brósti, í minsta lagi fýra mánaðir.

Burðartíttleiki/kvinna
2001




Kelda: World Bank 2003

Lond við nógvari fátækt fáa ikki ment seg, um tey skylda útlondum ov nógvan pening. Tey fáa ikki fíggjað menning sína, um tey ikki fáa meira fyri vørur sínar á heimsmarknaðinum.

Fíggjarstuðul má eisini fevna um umhvørvið, og hildið skal verða á at veita fátækum og neyðstøddum grundleggjandi hjálp.

# Nýtsla

Størsta atvoldin til, at heimsumhvørvið týnist, er óráðilig framleiðsla og nýtsla, serliga í ídnaðarlondum.

Ovurhonds eftirspurningur og skeivur lívsstílur í ídnaðarlondum leggja alstórt trýst á umhvørvið. Ímeðan fáa fátæk ikki skaffað sær føði, bústað og útbúgving, og tey fáa heldur ikki røkt heilsu sína til lítar. Hetta veksur um fátæktina og eigur at fáa fólk at hugsa seg ógvuliga væl um. Tað er alneyðugt við burðardyggari nýtslu, um endamálini í Agenda 21 skullu fremjast í verki.

**Orkunýtsla í heiminum**




Vit mugu greina tann partin av eftirspurninginum eftir náttúrutilfeingi, sum kemst av óráðiligari nýtslu. Samstundis mugu vit gera ásetingar fyri, hvussu vit fara best um tilfeingið, og hvussu vit dálka sum minst.

Vit mugu endurskoða fatan okkara av ríkidømi og vælferð. Vit mugu betra um lívskor okkara við øðrum lívsstíli. Einum lívsstíli, ið fer væl við avmarkaða tilfeingi okkara og lagar seg eftir tí, sum jørðin fær givið. Summir búskaparfrøðingar ivast í, um siðbundnar hugsanir um búskaparvøkstur eru so góðar. Teir leggja dent á, at vit mugu seta okkum búskaparmál, har vit ansa eftir virðinum á náttúrutilfeinginum. Hetta kann krevja nýggjar ávísar[4], sum rokna burðardygd uppí, tá ið búskaparstøðan hjá einum landi verður uppgjørd.

Øll lond eiga at stuðla arbeiðið fyri burðadyggari nýtslu, og ídnaðarlond eiga at ganga undan.

Fátækralond eiga at hugsa um burðadygga nýtslu, tá ið tey leggja búskap sín til rættis. Fátækralond eiga at fáa vissu fyri, at grundleggjandi tørvur teirra fátæku verður stillaður. Fátækralond mugu tálma nýtslu, ið vanliga verður hildin ikki at vera burðardygg, óvirkin og til órímiligan ampa fyri umhvørvið. Slíkt krevur bæði tøkniliga og aðra hjálp frá ídnaðarlondum.

Til at gerast burðardygg mugu londini:

- Finna vegir at menna búskap og vælferð, samstundis sum tey minka um orkunýtslu, rávørunýtslu og burturkast.
- Finna eina rætta heimsnýtslu, sum jørðin tolir.

Stjórnir eiga at:

- Stuðla munagóðari framleiðslu og tálma ovnýtslu.
- Menna leiðreglur, sum skunda undir ráðiliga nýtslu og framleiðslu.
- Eggja til at lata fátækralondum umhvørvisgóða tøkni.

Stjórnir og vinnulív noyðast at samstarva um rætta og burðardygga tilfeingisnýtslu, orkunýtslu og framleiðslu. Verður minkað um tilfar og orku til vøruframleiðslu og tænastur, verður eisini minkað um trýstið á umhvørvið, og økt verður um fíggjarliga framleiðsluorku og um kappingarføri.

Samfelagið noyðist at fáa bilbugt við vaksandi burturkasti við at eggja til

[4] fyribrigdi, ið vísa á onnur fyribrigdi

endurnýtslu, tálma ovnýtslu av pakkitilfari og hjálpa umhvørvisbetri vørum fram á marknaðin. Mangastaðni er brúkararørslan farin at geva umhvørvinum betur gætur, og samstundis er áhugin vaksandi hjá vinnuni at selja vørur, sum fara betur um.

Pappírsnýtsla fyri hvønn íbygva
1988 og 1998




Kelda: WRI, 2003

Saman við vinnulívi og øðrum eiga stjórnir í samsvari við t.d. brúkaralógina at menna ella víðka um umhvørvismerking og aðrar upplýsingarskipanir, sum greiðir fólki frá teirri heilsu- og umhvørvisávirkan, ið vørur hava.

Stjórnir keypa ofta sjálvar nógva vøru og eiga at ganga undan í rættari nýtslu, har til ber. Hvørki framleiðsla ella nýtsla verða broyttar í bræði uttan við prísstuðli og marknaðargjøldum, sum vísa, hvat tað kostar í umhvørvisrøkt at nýta orku, tilfar, náttúrutilfeingi og at beina burtur rusk. Stuðlað eigur at verða upp undir at nýta marknaðargjøld so sum umhvørvisgjøld, skattir og pant.

Øll mugu vit kenna ábyrgd og nýta vørur og tænastur við skili. Stjórnir og vinnulív kunnu stuðla burðardygga nýtslu við útbúgvingum og átøkum fyri at stimbra tilvit okkara. Harumframt ber til at stuðla lýsingum til frama fyri burðardyggar vørur og tænastur.

# 4.4 Fólkavøkstur

Fólkavøkstur og framleiðsluvøkstur hava við sær, at luft, jørð, vatn, orka og annað umráðandi tilfeingi er fyri alt størri trýsti. Í 1960 vóru vit umleið 3 milliardir fólk í heimi, í 2020 verða vit væntandi 8 milliardir.

**Folkavøksturin í heiminum 1960-2000**




Tá ið menningarætlanir verða lagdar, má sambandið millum fólkavøkstur, vistskipan og atgongd til tilfeingi verða greinað. Fremstu málini í menningini eru fátækt, tryggir arbeiðsmøguleikar, heilsa og lívsvirði, herímillum betran av støðuni hjá kvinnum. Við í menningarætlanum eiga at vera t.d. matvørutrygd, bústaður, vælferð hjá húskinum, gróðurseting av nýggjum skógi, grundleggjandi umhvørvisvernd og arbeiðspláss.

Lond eiga at hava fólkavøkstur við í ætlanum sínum fyri betri menning. Lond eiga at gera fólkatalsframrokningar og fólkatalsætlanir. Tey mugu eisini meta um, hvussu aldursbýtið fer at ávirka eftirspurningin eftir tilfeingi.

Lond mugu vita, hvussu nógvum fólki, tey fáa lívgað. Við hesum verður sipað til tað, sum tilfeingið kann bera, uttan at tað týnist. Serliga eigur at verða ansað eftir vatni, jørð, vistskipanum og lívfjølbroytni.

Heiminum tørvar, at øll lond eru raskari at gera forsagnir um úrslit av virksemi okkara, t.d. um tilfeingisnýtslu fyri hvønn íbúgva, fólkavøkstur og virðisbýti. Stórar fólkaflytingar eru væntandi, av tí at veðurlagsbroytingar og dálking fara at spilla veiðu- og veltingarmøguleikar hjá fólki. Heiminum nýtist tí eina ætlan fyri, hvat ið best er at gera - bæði tá ið fólkaflytingar eru úr týndum økjum, og tá ið fólkaflytingar sjálvar týna umhvørvið.

Burðardygg menning krevur betri burðarskipanir, so at færri børn og barnakonur doyggja, og sum veita kvinnum og monnum kunnleika og hjálp í burðaravmarking. Kvinnur eiga at fáa høvi til gitnaðarkanning, og tær skulu sleppa at hava børn síni nóg leingi á brósti. Kvinnum eiga eisini at verða tryggjaðir útbúgvingar- og arbeiðsmøguleikar.

**Folkavøkstur býtt eftir inntøku**




Fólkatalsætlanir eiga at vera partur av størri ætlanum, ið skulu fevna um t.d. tøkni, búsetingarmynstur, fíggjarviðurskifti hjá fólki, støðuna hjá vistskipanum og atgongd til tilfeingi. Tilfeingisumsiting skal vera burðardygg og skal nøkta fólksins tørv.

Fólkatalsætlanir mugu fáa undirtøku frá upprunafólki, vinnulívi, granskarum og frá politiskum, átrúnaðarligum og hevdbundnum myndugleikum. Ætlanirnar krevja eisini nóg nógva fígging, t.d. stuðul til fátækralond.

## 4.5 Heilsa

Góð heilsa veldst um umhvørvið, vit liva í. Vit mugu hava reint vatn, góð reinførisviðurskifti og nóg mikið av góðum kosti. Vit skulu ansa eftir bæði heilsu og umhvørvi.

Nakrar av avbjóðingunum í heiminum eru:

- Minst 15 milliónir børn doyggja hvørt ár av sjúku, sum sloppið kundi verið undan. Børnini doyggja t.d. av bráari smittu í andaleiðini, tvørrandi føði og lívsýki[5]. Ung eru alt meira plágað av rúsevnum, óviljaðum gitnaði og kynssjúkum.
- Flestu kvinnur í fátækralondum hava ikki umstøður at gera nakað við heilsuna ella støðu sína annars í samfelagnum. Møguleikarnir fyri gitnaðarverju eru eisini lítlir. Tær liva í fátækt, fáa vánaligan kost, og heilsan er ikki góð.
- Hóast koppingarevni og annar heilivágur er til, eru mong fongd av polio, koleru, tuberklum, spitalskusjúku, lívsýki og malariu. Hesar sjúkur standast av, at fólk hevur einki líkinda stað at búgva, einki reint vatn og vánalig reinførisviðurskifti. Sjúkufyribyrgingin er heldur ikki nóg góð.
- Mangastaðni leita so nógv í býirnar at búgva, at tað gerst ikki at nøkta grundleggjandi tørvin hjá øllum. Tí fáa fleiri hundrað milliónir hvørki líkinda arbeiði, kost, bústað ella aðrar neyðugar veitingar. Býardálking elvir sjúku og deyða, og í kjalarvørrinum á ovfólkan og vánaligum búviðurskiftum koma tuberklar, meningitis, sjúkir í andaleiðini og aðrar sjúkur.
- Í 2000 høvdu umleið 40 milliónir fólk HIV-smittuna. Hetta er álvarslig

[5] magailska (við tunnum skarni), ið summar sjúkur hava við sær

farsótt, sum ávirkar allan heim. Eyðkvæmisvirusið økir nógv um heilsuútreiðslurnar, men útreiðslurnar av mistari inntøku og minni framleiðsluorku eru upp aftur størri.

- Dálking frá orkuframleiðslu og orkunýtslu, ídnaði og flutningi fer illa við heilsuni hjá nógvum hundrað milliónum. Hóast batar hava verið, heldur umhvørvisdálkingin fram, fyrst og fremst, tí at stríðið ímóti dálking ikki megnar at fylgja við búskapargongdini.
- Upprunafólki er fyri stórum broytingum, og eru tey ofta meinari rakt enn onnur av arbeiðsloysi, vánaligum búviðurskiftum, vánaligari heilsu og fátækt.




Góð heilsa veldst um samfelagsliga, fíggjarliga og andliga menning, umframt góðan kost og reint vatn. Heiminum tørvar eitt dygt heilsuátak. Slíkt átak skal fevna um alt frá at betra um læknahjálpina og til at geva møðrum frálærutilfar um, hvussu tær fyribyrgja og viðgera lívsýki í heiminum. Fólkinum nýtist heilsukunning, koppseting og grundleggjandi heilivág. Sjúkufyribyrging eigur at verða lagað eftir tørvinum hjá heimafólkinum, og fólk skal verða lært at røkja og væla um heilsutól.

Nøkur ítøkilig heilsumál at seta sær eru at:

- Týna polio og fáa tamarhald á spitalskusjúku
- Fáa í lag og samskipa landstiltøk og altjóðatiltøk at fáa tamarhald á HIV-smittuni.
- Fáa tamarhald á tuberklum – serliga nýggjum avbrigdum, sum heilivágur rínur ikki á.
- Geva 95% av øllum heimsins børnum viðgerðarmøguleikar fyri smittu í andaleið.
- Minka um barnadeyða av lívsýki við 50-70%.
- Gera malariaætlanir fyri øll lond, har malaria ger álvarsliga um seg.
- Minka um meslingadeyða við 95%.




Hvørt land má hava sína heilsuætlan, sum m.a. fevnir um eina almenna landsheilsuskipan. Lond noyðast at:

- Hava ein landsheilsumyndugleika, sum skal ansa eftir og siga frá nýggjum smittusjúkum, ella um verandi sjúkur fara at vaksa.
- Menna egnar sjúkufyribyrgjandi skipanir, sum fevna um grundleggjandi heilsuviðurskifti so sum góðan kost, reint vatn og reinføri.
- Tryggja, at kvinnur og menn hava rættindi og neyðugar hentleikar til at kunna gera av, nær og hvussu nógv børn, tey vilja hava.
- Veita børnum grundleggjandi sjúkufyribyrging, herímillum koppseting og góðan kost, og verja

tey, so at tey verða ikki misnýtt kynsliga ella arbeiðsliga.

- Nýta góða og siðbundna vitan í landsskipanum fyri sjúkutýning.
- Menna skráir til at fáa reina luft bæði úti og inni og til at fáa trygga ruskviðgerð.
- Hava eftirlit við útbreiðslu og nýtslu av týningarevnum, so at tey eru til so lítlan ampa fyri heilsu okkara, sum gjørligt.

Øll lond eiga at hava skráir, sum kunnu staðfesta heilsuvandar frá umhvørvinum og minka um teir. Øll lond mugu gera umhvørvisvernd og heilsuligar trygdarskipanir til fastar tættir í menningarætlanum sínum. Fólk má verða lært at arbeiða við heilsuvandum, ið stava frá umhvørvinum.

Prosentpartur av fólki ið hava atgong til nøktandi saniterar hentleikar




## 4.6 Búseting

Ár 2000 búðu meiri enn helmingurin av okkum í býum. At býirnir vaksa er lutur í menningargongdini, og býirnir standa í miðal fyri 60% av bruttotjóðarúrtøkuni.

Fólkatalið í býðum 2000




Source: UNDP, 2003

Alt fleiri býir kenna sviðan av altjóða umhvørvis og menningarkreppuni - alt frá luftdálking til heimleys fólk. Hvørt ár elva skitið vatn og vánalig reinførisviðurskifti til nógva sjúku, og nógv doyggja, sum kundu sloppið undan.

Fyri at gera býarlívið meira burðardyggt , eiga stjórnirnar at síggja til, at fátæk, heimleys og arbeiðsleys fáa høvi at skaffa sær jørð, pening og ódýrt byggitilfar. Fólk má eisini fáa ognarrætt sín tryggjaðan, og tey mugu hava lógir, sum tryggja, at tey verða ikki koyrt úr búgvi sínum av órímiligum ávum.

Bøtt eigur at verða um óskipaðar búsetingar og fátækrabýlingar fyri at minka um bústaðarneyðina. Øllum býarpørtum nýtist reint vatn, reinførisútbúnað og skipaða rusksavnan. Í byggiætlanum eigur dentur at verða lagdur á nýta orskusparnan stíl, lokalt tilfar, sum fer væl við heilsu og umhvørvi, og byggihættir, sum geva arbeiði til so nógvar hendur, sum til ber.

Flutningur fer við um 30% av allari handilsligari orkuframleiðslu og um 60% av allari oljuframleiðslu í heiminum.

Útstoytsgass dálkar býarluft við støvi, osoni, kolsúrni og øðrum gassi, sum alt er heilsuskaðiligt. Neyðugt er tí við landsætlanum, sum stuðla sparandi og varandi orkutøkni, ið gagnnýtir sól, vatn, vind og lívrunnið tilfar. Í flutningsætlanum skal verða roynt at minka um tørvin á bilum við at fáa góðar, almennar flutningsmøguleikar og við at gera trygg øki til fólk á súkklu og til gongu. Býlingar eiga at verða skipaðir soleiðis, at stutt er til arbeiðis og at minkað verður um strekkið til ymiskar hentleikar.

Fyri at fáa færri fólk at flyta í býirnar, mugu myndugleikar skapa bygdunum betri umstøður og styðja menningina av miðalstórum býum, sum kunnu geva fólki arbeiði og búgv. Skilagóð umsiting er neyðug, so at ikki ótálmað verður bygt í bøi og viðkvæmum náttúruøkjum.

Umráðandi er eisini at byggja á røttum stað og somikið sterkt, at illveður, áarføri, jarðskjálvti ella omanlop ikki gera ov nógv um seg.

Fátækralondum tørvar fíggjarligan og tøkniligan stuðul at útbúgva serfrøðingar í býarskipan, ruskavmarkan, vatnviðurskiftum, reinførisviðurskiftum, orkusparing og flutningi.

## 4.7 Avgerðir um burðardygga menning

Flestu okkara - sama, hvar vit virka í samfelagnum - taka avgerðir soleiðis, at vit skilja ímillum fíggjarlig, samfelagslig og umhvørvislig viðurskifti. Neyðugt er at hava ans fyri sambandinum millum menning og umhvørvi fyri at kunna taka avgerðir, ið eru bæði fíggjarliga, samfelagsliga og umhvørvisliga rættar.

Summar stjórnir eru miðvíst farnar at meta um, hvørji umhvørvisárin kunnu standast av politiskum ætlanum um t.d. búskap, orku, landbúnað og flutning. Nógvir bólkar eru við til at taka avgerðir í slíkum málum. Hetta verður gjørt við orðaskifti millum landsmyndugleikar og økismyndugleikar, vinnufólk, vísindafólk, umhvørvisfólk og almenningin.

Stjórnir eiga at leggja ætlanir um burðardygga menning, har almanna- og umhvørvispolitikkur eru fastir tættir á øllum økjum og í øllum lutum, eisini í skattalóggávu og í fíggjarætlanarviðgerð.

Ætlanir eiga at miða eftir eini sosialt ábyrgdarfullari búskaparmenning, og at væl verður farið við umhvørvi og tilfeingi hjá eftirkomarum okkara. At fáa tey, sum taka avgerðir, at ganga frá áhuga sínum fyri einstøkum og avmarkaðum økjum, og til at taka umhvørvið við í politisku ætlanir sínar um skilvísa menning, fer at krevja broyttar arbeiðshættir í upplýsing, umsiting og ráðlegging. Skal fólkið taka rættar avgerðir, má tað fáa regluligar støðufrágreiðingar um burðardyggu menningina. Tær skulu samanbera fíggjarligar og sosialar støður og rák, og tær skulu innihalda upplýsingar um, hvussu til stendur við umhvørvi og náttúrutilfeingi. Í tjóðarroknskapi eigur at verða ansað eftir lutinum hjá umhvørvinum sum burturbeiningarstøð og sum kelda fyri natúrlig peningavirði.

Umhvørvislóggáva tykist ofta sløðin og tilvildarlig, ella verður ov sjáldan dagførd og útint í verki. Stjórnir eiga at stuðla lógararbeiði fyri burðardyggari menning. Hetta arbeiði skal verða grundað á skilagóðar búskaparligar, samfelagsligar og umhvørvisligar grundreglur og hóskandi árinsmetingar[6]. Lógirnar skulu verða útintar í verki.

Prísir, marknaðir, skatta- og fíggjarpolitikkur skapa eisini hugburð og atburð, tá ið talan er um umhvørvi. Vit síggja umhvørvið sum ein ókeypis hentleika, og umhvørvisskaðar verða onnur at gjalda, antin myndugleikar, onnur lond ella eftirkomarar okkara. Umhvørvisútreiðslur eiga at vera sjónskar hjá framleiðarum og brúkarum, og prísirnir eiga at svara til virðið og trotið á tilfeinginum. Hesar broytingar eru neyðugar, tá ið ræður um orku, flutning, vatn, rusk, heilsu, landbúnað, skógarvinnu og ferðavinnu.

Stjórnir eiga at taka burtur ella minka um stuðul, sum ikki fremur burðardygga menning og eiga at leggja seg eftir samsvarandi príspolitikki. Lond, sum eru í búskaparligari menning, ella sum eru við at leggja um til marknaðarbúskap, eiga at fáa tøkniligan stuðul og ráð um, hvussu marknaðurin kann stuðla burðadyggu menningini rætt.

---

[6] metingar av, hvussu eitthvørt virksemi ella fyribrigdi kann ávirka viðurskifti uttan um seg

# 5. TILFEINGISVERJA OG TILFEINGISUMSITING

## 5.1 Verja av lofthavinum

Lofthavið verður alt meira dálkað av vakstrarhúsgassum og øðrum evnum, sum broyta veðurlag og osonlag. Onnur dálkandi evni, t.d. tey, sum elva súrregn, verða mangan borin við luftini í onnur lond, har tey dálka bæði vatn og jørð.

Innihaldið av koltvíilti í lofthavinum
(Mauna Loa, Hawaii)




Source: D. Keeling and T. Whorf, 2003

Orkunýtsla er ein meginorsøk til luftdálking. Hon er neyðug fyri búskaparliga og sosiala menning og fyri at bøta um lívsvirði okkara. Um orkunýtslan økist munandi, má hon broytast. Fyri at minka um dálkingini, má meira fáast burtur úr bæði nýtsluni, framleiðsluni og útbreiðsluni, og funnið má eisini verða fram til umhvørvisbetri orkusløg.

Tørvur er á meiri orku til at nøkta vaksandi nýtsluna í fátækralondum. Greiða má eisini fáast á, hvussu tey lond skulu gera, sum eru bundin at forgeingiligum orkukeldum so sum koli og olju . Hjá summum teirra eru eingi einføld ráð at taka til.

Stjórnir eiga at:

- Áseta føst tjóðarmát fyri orkunýtslu og útláti og stimbra almennum áhuga fyri umhvørvisvinarligari orkukeldum.
- Gera betri frymlar fyri mongdina á teimum evnum, sum dálka luftina, og á teimum vakstrarhúsgassum, sum kunnu ávirka veðurlagið – og harvið umhvørvið.
- Nútímansgera verandi orkuskipanir, so tær gerðast meira virknar, og menna nýggja og varandi orkutøkni, ið gagnnýtir t.d. sól, vatn, vind, jarðhita og lívrunnið tilfar.
- Eggja fólkinum til at menna og nýta munabetri og reinari orku.
- Samskipa ymsar orkuætlanir, so lættari verður at framleiða og útbreiða umhvørvisgóða orku.
- Stíla fyri umhvørvisárinsmetingum[7] og øðrum tiltøkum fyri at gera orku, umhvørvi og búskap til fastar tættir í avgerðargongdum.
- Síggja til, at vørur verða orkumerktar, so at brúkarin lættliga sær, hvussu nógv orka krevst at gera ávísa vøru.

Alheimslig útlát av koltvísúrni
1800-1999




Kelda: G. Marland o.ø. 2002

[7] metingum av, hvussu eitthvørt virksemi kann ávirka umhvørvi

Flutningur er alneyðugur fyri búskaparliga og sosiala menning, og flutningstørvurin fer óivað at vaksa – men flutningur dálkar eisini luftina.

Stjórnir eiga at:

- Menna eina munagóða, kappingarføra, reina og trygga kollektivferðslu á bygd og í bý. Vegakervið skal ikki vera til óneyðugan ampa fyri umhvørvið.
- Lata flutning fara so væl við umhvørvinum, sum gjørligt.
- Leggja byggiætlanir soleiðis til rættis, at tær hava við sær ráðiligan flutning.

Ídnaðurin framleiðir vørur, tænastur og útvegar arbeiði, men hann dálkar eisini luftina. Ídnaðurin má gagnnýta tilfeingið betur, dálka minni, nýta evni, sum ikki týna osonlagið, og serliga má hann minka um burturkastið.

Stjórnir eiga at:

- Nýta fyrisitingarlig og búskaparlig amboð, sum kunnu hjálpa ídnaðinum at menna tryggari, reinari og munabetri tøkni.
- Hjálpa til við at útvega fátækralondum slíka tøkni.
- Skipa fyri og gera eftir umhvørvisárinsmetingum fyri at fremja ein burðardyggan ídnað.

Osonlagið verður enn týnt av CFC-gassum[8], halongassum[9] og øðrum evnum. Stjórnir eiga at útinna altjóða avtalur um at minka um osonskaðilig evni. Neyðugt er at finna trygg evni at nýta í staðin, og øll lond skulu fáa høvi at nýta tey.

Grundað á gransking av teimum skaðum, ið økt ultraviolett geisling hevur við sær, eiga stjórnir at umhugsa tiltøk til at verja mannaheilsu, landbúnað og lív í sjónum.

Stjórnir eiga at menna og styrkja økisavtalur sum t.d. 1979-sáttmálan um luftdálking um landamørk[10]. Málið má vera at minka um tey evni, ið skaða heilsu okkara, dálka skógir og súrga áir og vøtn. Øll lond eiga at hava góðar ávaringar- og tilbúgvingarskipanir í sambandi við luftdálking, ið stavar frá ídnaði, náttúruvanlukkum ella tilfeingistýning.

---

[8] føst, lívrunnin evnasambond, ið eru ring fyri osonlagið. Vórðu ofta nýtt sum frostløgur í t.d. køliskápum.

[9] føst, lívrunnin evnasambond, har serliga klor og brom eru ring fyri osonlagið. Verða verða ofta nýtt í eldsløkkjarum.

[10] enska heitið er "1979 Convention on Long-range Transboundary Air Pollution"

## 5.2 Burðardygg jarðarnýtsla

Øktur eftirspurningur eftir jørð og náttúrutilfeingi elvir til kapping og trupulleikar. Skulu vit nøkta eftirspurningin rætt, mugu vit loysa trupulleikarnar og finna aðrar vegir at nýta jørð og náttúrutilfeingi.

Málið er at nýta jørðina soleiðis, at líkindini fyri burðadygga menning batna. Best er tí at avmarka trupulleikarnar og at knýta samfelagsliga og búskaparliga menning at umhvørvisvernd. Fyrilit skal verða havt fyri friðaðum økjum, ognarrætti og rættindum hjá upprunafólki.

Tá ið eftirspurningurin eftir jørð økist, er neyðugt at stuðla siðbundnari jarðargagnnýttslu. Hetta, fyri at verja jørðina, lívfjølbroytnið og aðrar vistligar[11] gripir.

Tá ið avgerðir verða tiknar um lógir, reglugerðir og búskaparligan stuðul til frama fyri burðadygga jarðarnýtslu, skal ansur verða vístur fyri umhvørvisligum, samfelagsligum og búskaparligum viðurskiftum.

Lond eiga at:

- Menna ein politikk, sum hevur fyrilit fyri tøkari jørð, fólkatalsbroytingum og áhugamálum hjá heimafólki.
- Menna og útinna lóggávur og reglugerðir, sum stimbra ráðiliga jarðarnýtslu og avmarka, at velt jørð verður nýtt til annað enn landbúnað.
- Nýta framferðarhættir sum t.d. vistligar lendisætlanir, ið leggja dent á vistskipanir og vátlendi, og sum stuðlar einum varandi lívsstøði.
- Taka atlit til siðbundnan og hóskandi landbúnað sum t.d. neytahald hjá nomadum, økisfriðing og bríkavelting[12].
- Síggja til, at allir partar eru við í avgerðargongdini, serliga teir, sum sjáldan verða hoyrdir. Hetta eru ofta heimafólk, serstakliga ungdómur og kvinnur.
- Royna ymsar hættir at virðisfesta jørð og vistskipanir í landsbúskaparfrágreiðingum, t.d. tá ið bruttotjóðarúrtøka verður roknað.
- Tryggja, at stovnar, sum arbeiða við jørð og náttúrutilfeingi, hugsa um umhvørvi, samfelag og búskap, tá ið teir leggja ætlanir sínar.

[11] vistfrøðiligar

[12] tað, at velt verður í teigum, sum eru forskotnir hvør av øðrum í hædd

## 5.3 Skógartýning

Skógur gevur okkum við, brenni og aðra vøru. Skógur er umráðandi fyri jørð, vatn, luft og lívfjølbroytni. Skógur veksur aftur, og fara vit væl um hann, er hann ein gripur fyri menning okkara.

Skógarøki býtt uppá heimsparti 2000




Kelda : FAO, 2003

Vit hava tó ikki farið væl um skógin, og tí er hann illa fyri mangastaðni. Hetta kemst av øktum landbúnaði, ovskipan, skilaleysari skógarvinnu og luftdálking. Tað, at skógurin ferst ella minkar, hevur við sær, at jørðin máast burtur, lívið verður fábroyttari, dýr missa búøki síni, áir og vøtn forfarast, og minni verður av viði, brenni og øðrum vørum, sum fólki tørvar. Harafturat verða færri trø at taka upp koltvíiltina.

Broytingar í skógarøkjum 1990-2000




Kelda : FAO, 2003

Skal skóginum verða lív lagað, mugu vit ásanna tørvin at verja hann við teimum virðum, ið hann hevur fyri vistskipan, veðurlag, samfelag og búskap. Hesi virði eiga at verða fastur partur í búskaparfrymlum, sum nýttir verða at áseta rættar menningarleiðir.

Bæði í ídnaðarlondum og í fátækralondum er stórur tørvur á góðari skógarrøkt, so til ber at varðveita og endurbyggja vistjavnvágina og nøkta fólksins tørv. Stjórnir mugu samstarva við vinnulív, granskarar, heimafólk, felagsskapir og økismyndugleikar fyri skapa ein framskygdan politikk til frama fyri skóg og vatn.

Betri umsiting krevur betri vitan um skóg. Ofta vænta grundleggjandi upplýsingar um stødd og slag á skógum, og hvussu nógv trø kunnu verða høgd. Stjórnir eiga at gera landsætlanir um ráðiliga skógarvinnu.

Saman við vinnulívi, privatum felagsskapum og øðrum bólkum eiga stjórnir at:

- Gróðurseta nýggjan skóg fyri at lætta um trýstið á gamlan skóg og frumskóg.
- Gróðurseta dýran gagnvøkstur millum trøini fyri at økja um skógarvirðið.
- Ala fram viðarsløg, sum eru lívseig og breiða seg skjótt.
- Verja skóg móti eldi, skaðadýrum, veiðutjóvum og námsvinnu.
- Minka um skógardálking – eisini slíka, sum kemst av luftdálking úr øðrum londum.
- Avmarka og helst steðga spillandi broytingum og veltingarhættum. Hetta gerst við at greiða teir samfelagsligu og vistligu trupulleikar, sum eru orsøk til spillandi virksemið.
- Fáa umhvørvisbetri, munabetri og reinari skógarvinnu og menna ídnað, sum nýtir við og annan skógarúrdrátt.
- Minka sum mest um burturkastið frá træídnaði og fáa ónýtt viðarsløg fram á marknaðin.

- Stuðla lokalari smávinnu í skógum til frama fyri bygdirnar.
- Stimbra virðisskapandi, sekundera skógarvinnu fyri at fáa betri arbeiðsmøguleikar og betri úrtøku fyri hvørt træ, ið høgt verður.
- Gróðurseta skóg nærindis býum fyri at lívga um náttúruna allastaðni, har fólk býr.
- Stimbra nýtsluna av skógarúrdráttum sum t.d. náttúruheilivági, litevnum, gummi, harpiksi og bambusi.
- Stuðla lokalum handverkarum.
- Stuðla burðardygga skógarnýtslu sum t.d. vistferðavinnu og umsiting av tí ílegutilfeingi[13], sum skógurin goymir.
- Minka um skógarskaða við at stuðla rættari umsiting av økjum, sum liggja upp at skógi.

Nøkrum londum tørvar altjóða ráðgeving um nýggja tøkni fyri at fáa meiri burtur úr skógum sínum. Tørvur er eisini á rættvísum handilsmøguleikum, har ongar einvegis avmarkingar og forboð eru. Umframt at hava skynsama skógarnýtslu, noyðast lond at friða øki ella at vaksa um verandi øki, so til ber at varðveita summar skógir. Hetta er neyðugt fyri at verja vistskipanir, lívfjølbroytni, lendi og búøki hjá villdýrum. Neyðugt er eisini at varðveita skógir við teimum samfelagsligu og heilsubøtandu virðum, teir hava. Herímillum teljast búøki hjá heimafólki og ymsum øðrum lokalum bólkum.

[13] tilfeingi av arvaeginleikum

## 5.4 Oyðimerkur

Oyðimerkur vaksa, av tí at jørð verður týnd av veðurlagsbroytingum og mannavirksemi. Viðbrekið turrlendi er serliga illa fyri. Sjónskastu avleiðingarnar av oyðimarkarvøkstri eru verri beiti og minni grøði. Aðrar avleiðingar eru t.d. fátækt og svongd. Miðskeiðis í 1980-unum doyðu um tríggjar milliónir fólk sunnan fyri Sahara av svongd, sum komst av turki.
Trupulleikin er alstórur. 70% av øllum turrlendi – 3,6 milliardir hektarar - eru longu farin at týnast. Hetta er fjórðingur av øllum heimsins lendi – eitt øki, sum er tríggjar ferðir størri enn Evropa.

Jørðin týnist serliga, tá ið hon gerst sølt av vatntroti, og hetta ávirkar stór búnaðarøki við sjálvvirkandi vætuskipanum. Skulu vit steðga oyðimarkarvøkstri, má øll jarðarnýtsla gerast vistfør[14], vinningsfør, rættvís og samfelagsliga rímilig.

Eitt tað mest umráðandi í stríðnum ímóti oyðimarkarvøkstri er at gróðurseta trø. Trø og annar vøkstur goyma vatn og eru góð fyri jørðina. Tey kunnu harafturat verða høgd til við, fóður og føði.

Fyri at vinna á oyðimarkarvøkstri eiga stjórnir at:

- Samtykkja landsætlanir fyri ráðiliga jarðarnýtslu og umsiting av vatntilfeingi.
- Skunda undir gróðurseting við at nýta skjótvaksandi og lívseigan, lokalan vøkstur.
- Stuðla orkusparing og nýggjum orkusløgum, so at eftirspurningurin eftir brenniviði minkar.

Har vandi er fyri oyðimørkum og turki, er vanligur landbúnaður ofta óráðiligur, serliga tá ið hugsað verður um fólkavøksturin. Heimafólkið má verða lært í jarðar- og

[14] vistfrøðiliga burðardygg

vatnvarðveitslu, búnaðarfrøði og at gera smáar vætuskipanir. Landsætlanir ímóti oyðimarkarvøkstri eru ein treyt fyri at økja um almenna kunnleikan um teir arbeiðshættir, ið neyðugir eru fyri at loysa trupulleikarnar.

Fátækt er umvarðandi mál, tá ið talað verður um oyðimarkarvøkstur. At lætta um trýstið á illa fyrikomin øki, er neyðugt at útvega fólki annað arbeiði.

Stílað eigur at verða fyri lánsskipanum á bygd, so at fólk fær stovnað smáar fyritøkur, ið nýta lokalt tilfeingi.

Innan juni 1994 eigur at verða gjørdur altjóða sáttmáli at steðga oyðimarkarvøkstri – serliga í Afrika.

*(ST-sáttmálin um oyðimarkarvøkstur varð samtyktur 17. september 1994).*

## 5.5 Burðardygg menning av fjallalendi

Fjøll eru umráðandi fyri orku, mineral, skóg, vatn og landbúnað, og tey eru týðandi frítíðarøki. Fjøll eru somuleiðis rík við lívi, eru tilhald hjá fleiri hóttum plantum og dýrum, og hava stóran týdning fyri heimsvistskipanina.

Fjøll hava beinleiðis ávirkan á lívið hjá helminginum av mannaættini. Umleið tíggjundi hvør okkara býr uppi í fjøllum og umleið 40% -við áarbakkarnar niðriundir. Úr Andesfjøllum til Himalaia, úr Landsynningsasia til Eystur- og Miðafrika, eru vistskipanir kring áarbakkarnar heilt illa fyri. Hetta kemst m.a. av avskógan, ovskipan, og at velt verður í rakjørð.

Vistskipanir í fjøllum eru viðbreknar fyri jarðarmáan, omanlopi, lívfjølbroytnimissi og búøkismissi hjá dýrum. Fólk, ið býr í fjallalendi eru sermekt av stórum arbeiðisloysi, fátækri og vánaligara heilsu. Í dag eru mong fjallalendi fyri umhvørvistýning. Skulu vit umsita tilfeingið í hesum økjum væl og geva fólkinum høvi at mennast, er at fara til verka alt fyri eitt. Málið er at steðga jarðarmáan, lívga um gróður og dýr, og varðveita vistjavnvágina í fjøllum.

Neyðugt er eisini at veita heimafólki og lokalum bólkum útbúgving og heilsurøkt og orkuskipanir. Fólkinum tørvar fleiri og betri møguleikar at vinna sær fyri lívsins uppihald. Hetta kann t.d. vera ferðavinna, námsvinna, fiskiskapur og heimayrki sum t.d. at virka grøðiplantur og angaplantur.

Stjórnir eiga at:

- Stuðla einføldum, praktiskum og ódýrum loysnum at fáa tamarhald á jarðarmáan.
- Eggja fólki til at verja tilfeingið og at nýta umhvørvisgóða tøkni.

- Kunna fólk um burðardygga menning í fjøllum, og lata tey vera við til at umsita tilfeingið.
- Kunna fólk um aðrar møguleikar fyri landbúnaði, húsdjórahaldi, býfluguhaldi, heimayrki, marknaði og flutningi.
- Friða øki fyri at verja lívfjølbroytni.
- Eyðmerkja viðbrekin fjallalendi, har stórur vandi er fyri jarðarmáan, vatnflóð, omanlopi, jarðskjálvta, skalvalopi og øðrum náttúruvanlukkum, og menna góðar ávaringar- og tilbúgvingarskipanir.
- Eyðmerkja fjallalendi, sum kunnu verða fyri luftdálking úr býum og ídnaðarøkjum nærindis.
- Stíla fyri kunningarstovum, har fólk kann leita sær ráð og leiðbeining um burðardygga menning í fjallaøkjum. Stovurnar skulu veita serkøna vitan um landbúnað og varðveitslu.

## 5.6 Burðardyggur landbúnaður

Svongd er longu ein støðug hóttan og gerandisgestur hjá nógvum, og óvist er, um heimurin fær nøktað vaksandi tørvin á mati og øðrum landbúnaðarvørum í framtíðini.




Kelda: Living Planet Report, UNEP, 2002

Í 1960 vóru vit 3 milliardir fólk í heimi, og í 2025 verða vit væntandi 8,5 milliardir. Av hesum fara 83% at búgva í fátækralondum. Ein tann størsta avbjóðingin er at fáa burðardyggan landbúnað og meiri grøði, so at øll kunnu fáa seg mett.




Kelda: Living Planet Report, UNEP, 2002

Hóast eftirspurningurin eftir matvørum, trevjum og olju er vaksandi, so er framleiðslan minkandi í fleiri stórum landbúnaðarøkjum. Jarðarmáan, vatnflóð og saltseting gera alt meira um seg, og mangastaðni fruktar jørðin alt minni.

Økt ultraviolett geisling kann eisini hava við sær, at grøðin minkar upp aftur meira.

Av tí at meginparturin av bestu jørðini longu er veltur, noyðist landbúnaðurin at økja um grøðina fyri at nøkta tann vaksandi tørvin. Samstundis skal ikki ov nógv verða velt í rakjørð.

Burðardyggur landbúnaður krevur stórar broytingar í landbúnaðarpolitikki, umhvørvispolitikki og fíggjarpolitikki, bæði innlendis og í altjóða samanhangi. Til tess krevst samstarv millum bygdarfólk, stjórnir, vinnulív og altjóða samfelagið.

Arbeitt verður longu við at økja um grøðina, minka um skaðadýraárin og at varðveita jørð og vatn, men higartil hevur arbeiðið ikki verið nóg væl skipað. Nú farið er um aldarskiftið, eiga stjórnir at føra ein ábyrgdarfullan matvørupolitikk, sum er grundaður á teir umhvørvisligar fyrimunir og vansar, ið politiskar avgerðir hava við sær.

Til at fáa landbúnaðin burðardyggan, er neyðugt at varðveita vistskipanir, t.d. vatn og vátlendi. Fólki eigur at verða stuðla at gera íløgur í landbúnað afturfyri at fáa ognarrætt og atgongd til bæði fíggjarligt og marknaðarligt tilfeingi.

Fólkinum nýtist ráðgeving og útbúgving at nýta tøkni og veltingarhættir, sum fara væl um jørðina, samstundis sum meira verður framleitt. Her er at nevna skiftivelting[15], bríkavelting, taðing, skógarjarðarbrúk og blandað jarðarbrúk. Bæði nýggir og gamlir arbeiðshættir eiga at verða nýttir.

Um matvøruframleiðslan skal økjast eigur hetta at fara fram við eini samanblanding av forgeingiligum og varandi orkukeldum, herundir nýtsla av orku frá trøðum og plantum. Neyðugt er at fáa meiri burtur úr tí fjølbroytta ílegutilfeingi, sum heimurin goymir. Hetta, fyri at spjaða og økja um matvøruframleiðsluna og fyri at fáa betri húsdjór. Alsamt útdoyggja ómissandi plantur og dýr, og tey, sum arbeiða við at lívga um ílegutilfeingið, fáa ov lítlan fíggjarstuðul og eru ov illa mannað. Úrslit av plantugransking og plantumenning eiga at verða brúkara og framleiðara at eins stórum gagni.

Mett verður, at skaðadýr spilla fjórðingin av allari grøði. Ofta verða týningarevni nýtt, men ovnýtsla er kostnaðarmikil og fer illa við umhvørvi og heilsu okkara.

Besti háttur at sleppa undan skaðadýrum er at nýta mótstøðuførar plantur og hóskandi jarðarbrúk. Hetta minkar um týningarevnini og útreiðslurnar, tryggjar grøðina og fer betur um umhvørvið.

Fyri at fátækrafólk á bygd ikki skal velta rakjørðina, er umráðandi at menna annað arbeiði enn landbúnað so sum heimayrki, fiskiskap, ferðavinnu o.a.

---

[15] tað, at skift verður ímillum at velta ymsa grøði í somu jørð

## 5.7 Varveitan av lívfjølbroytni

Størstu góðgripir og hentleikar okkara eru treytaðir av nógvum og fjølbroyttum lívi, bæði hvat viðvíkir gróðri, djórum, vistskipanum og okkum sjálvum. Burtur úr hesum lívfrøðiligt tilfeingi fáa vit t.d. mat, klæði, hús, heilivág og andlig virði. Tilfeingið finst í natúrligum vistskipanum sum skógum, grasfløtum, oyðimørkum, frostmýrum, áum, vøtnum og høvum. Tað er eisini í bø og haga, í viðarlundum, plantugørðum og djóragørðum.

Lívfrøðiligt tilfeingi gerst alt fábroyttari. Hetta kemst ofta av týndum lívsgrundarlagi og búøkjum, av dálking og óhepnum royndum at flyta plantur og dýr úr eini vistskipan í aðra.

Alneyðugt er at arbeiða bæði skjótt og væl, um vit skulu varðveita lívfjølbroytnið. Nýggj framstig innan lívtøkni[16] vísa, at ílegutilfar í plantum og dýrum kann vera til gagns fyri landbúnað, umhvørvi, heilsu og trivnað okkara.

Stjórnir eiga at samstarva við ST, sjálvbodnar felagsskapir, vinnulív og fíggjarstovnar um at:

- Gera landsmetingar um støðuna viðvíkjandi lívfjølbroytni.
- Leggja ætlanir fyri, hvussu vit nýta og verja lívfjølbroytni rætt, og samskipa hesar ætlanir við landsmenningarætlanir.
- Fremja siðbundna skógarvinnu, landbúnað og náttúru- og veiðurøkt, sum gagnnýta, varðveita og økja um lívfjølbroytni.
- Síggja til, at ágóðar av lívfrøðiligt tilfeingi og ílegutilfeingi gagna brúkara og framleiðara eins væl. Upprunafólk og samfelag teirra skulu hava lut í fíggjarligum og handilsligum fyrimunum.
- Verja natúrlig búøki. Slík øki kunnu verjast upp aftur betur við at stuðla umhvørvisgóðari menning
- Stuðla arbeiðinum at endurreisa týndar vistskipanir, og friða og lívga um hótt djórasløg.
- Menna skynsama lívtøkni og tryggja, at fátækralond fáa hana á rættan og tryggan hátt.




Kelda: WRI, 2003

[16] tað, at livandi verur verða nýttar í einhvørjari viðgerð ella framleiðslu

## 5.8 Lívtøkni

Í lívtøkni verða livandi verur nýttar til ymiska viðgerð og til at gera nýggjar vørur.

Lívtøkni kann vera sera gagnlig á mangan hátt. Hon kann t.d. geva okkum reinari vatn, meiri mat, meiri skóg, betri heilsu, betri arbeiðshættir í ídnaðinum og betri viðgerð av vandamiklum burturkasti.

Mesta lívtøknin er ment í ídnaðarlondum. Hon slóðar fyri nýggjum møguleikum fyri einum heimsfelagsskapi millum ídnaðarlond, sum hava stóran tøkniførleika - og fátækralond, sum hava stórt lívtilfeingi, men vantandi fíggjarorku og kunnleika at gagnnýta tað.

Í samstarvi við altjóða felagsskapir, sjálvbodnar felagsskapir, vinnulív og granskingarstovnar eiga stjórnir at betra um plantu- og djóraaling við bæði vanligari og nútímans tøkni. Upprunafólk hevur nógv at geva á hesum øki og eigur tí at fáa sín lut í fíggjarligum og handilsligum ágóðum, ið lívtøkni gevur. Ansast má eftir, at nýggja tøknin er ikki til ampa fyri heilsu og umhvørvi. Fólk eigur at kenna bæði fyrimunir og vansar við henni. Tørvur er á altjóða góðkendum grundreglum fyri, hvussu øll lívtøkni verður fylgjumett og umsitin.

Vit eiga at menna lívtøkni fyri at kunna:

- Betra um framleiðsluorku, haldføri og føðsluvirði, tá ið ræður um matvørur og djórafóður .
- Menna koppingarevni og heilsutøkni fyri at hindra sjúkum og eiturevnum at spjaðast.
- Gera grøðina mótstøðuførari móti sjúkum og skaðadýrum, so at tørvurin á týningarevnum minkar.
- Menna tryggar og munagóðar hættir at vinna á smittandi skordýrum, serliga teimum, ið eru mótstøðufør móti týningarevnum.
- Gera jørðina fruktabetri og økja um evnini hjá gróðri at taka upp og nýta føðsluevni, soleiðis at jørðin ikki missur føðievni til umhvørvið.
- Fáa varandi orku og ráevni burtur úr lívrunnum burturkasti og gróðri.
- Viðgera spillvatn, spillolju og lívrunnið burturkast bíligari og meira virki enn higartil.
- Góðska gagnvøkstur, ið ov lítið fæst burturúr, sum er.
- Ala fram fleiri skjótvaksandi viðarsløg – serliga til brenni.
- Minkað verður um umhvørvisárinini í samband við útvinning av mineralum.

## 5.9 Fyrisiting og verja av høvunum

Havið eigur sín munandi lut í heimsvistskipanini. Tað fevnir um meginpartin av jarðarflatuni, ávirkar luft, veður, veðurlag og gevur okkum alt meiri føði og tilfeingi.

Umleið 70% av allari havdálking koma av landi, t.d. býum, ídnaði, landbúnaði, skógarvinnu og ferðavinnu.

Evnini, sum eru størsta hóttan ímóti havumhvørvið, eru spillvatn, kemikaliur, botnsig, húsarhaldsrusk, plast, metal, olja og geislavirkið burturkast. Summi av hesum evnum eru eitrandi, niðurbrótast seint og rúgvast upp í lívverum.

Skip og søkt burturkast dálka eisini. Um 600.000 tons av olju fara á sjógv um árið. Tey stava frá skipaferðslu, óhappum og ólógligum útláti.

Londini eiga at binda seg til at hava eftirlit við og at minka um týningina, so til ber at verja og bøta um ta stóru framleiðsluorku, ið havið hevur.

Neyðugt er at:

- Forða fyri, at havumhvørvið týnist meira, og at minka um vandan fyri langtíðar og varandi oyðileggingum.
- Gera árinsmetingar av virksemi, sum kann gera havinum stóran skaða.
- Gera havumhvørvisvernd til fastan tátt í umhvørvis-, almanna-, og fíggjarpolitikki.
- Betra um lívskorini hjá strandarbúgvum – serliga í fátækralondum, so at teir kunnu hjálpa til við at verja strendur og havumhvørvi.

Lond noyðast at byggja og røkja reinsiverk til spillvatn og forða fyri, frárensl nærindis fiskiøkjum, vatnveitingum, baðstrondum og økjum, har roynt verður eftir skeljadjórum. Neyðugt er eisini at hava eftirlit við og viðgera spillvatn frá ídnaði á rættan hátt.

Londini eiga at umhugsa at:

- Minka um ella fáa burtur útlát av syntetiskum evnum, sum eru farin at rúgvast so nógv upp í havumhvørvinum, at vandi er á ferð.
- Hava eftirlit við og minka um útlát av eiturevnum og skipa fyri tryggari ruskviðgerð á landi, heldur enn at søkkja evni í havið.
- Gera strangari altjóða skipanir fyri at minka um vandan fyri dálking og óhappum av skipaferðslu.
- Hava eftirlit við útláti av køvievni og fosfori, sum elva til ovgróður og tískil broyt havumhvørvi.
- Fremja nýggjar mannagongdir í landbúnaði, so at minni jørð og burturkast fara í áir og haðani á sjógv.
- Forbjóða umhvørvisskaðiligum týningarevnum og handilstøðum og nýta betri hættir at týna skaðadýr.
- Seta bann móti, at burturkast verður søkt ella brent úti á havi.

Ávísir partar av havumhvørvinum, t.d. korallriv, mangrovuskógur og ósar, eru millum fjølbroyttastu og virknastu vistskipanir í heimi. Tær verja strendurnar, geva okkum mat og gagna ferðavinnu og búskapi. Nógvastaðni eru hesar vistskipanir hóttar ella fyri stórum trýsti. Lond mugu tí verja tær fyri skaðiligum árinum frá virksemi á landi og hava eftirlit við, at strendurnar ikki máast burtur.

Fiskiskapur gevur okkum millum 80 og 90 milliónir tons av fiski og skeljadjórum um árið. Ovfiskiskapur og ólóglig veiða gerast alt vanligari, og alt fleiri vistskipanir verða týndar.




Kelda: WRI, 2003

Londini binda seg til at varðveita og nýta havumhvørvið við skili. Herímillum er fiskiveiða, skeljadjóraveiða og havsúgdjóraveiða.

Londini eiga at:

- Skipa ein politikk, sum skal arbeiða fyri burðardygga nýtslu av havinum, og sum samstundis hevur fyrilit fyri tørvinum hjá upprunafólki og økissamfeløgum.
- Samráða seg fram til altjóða avtalur um, hvussu fiskastovnar verða umsitnir og varðveittir.
- Styrkja eftirlitið við fiskiskapi.
- Minka um spillpartin, tá ið fiskur verður veiddur, handfarin og góðskaður, og minka um hjáveiðu av fiski, sum verður útafturtveittur.
- Meta um fylgjurnar, sum nýggir veiðuhættir hava fyri umhvørvið, og nýta umhvørvisgóða fiskitøkni.
- Forbjóða veiðu við eitri, spreingievnum og tílíkum.
- Verja serstøk øki so sum korallriv, ósar, mangrovuskóg, grastaraskóg og onnur gýtingarøki og uppvakstrarøki hjá fiski.
- Forða skipum at fara undir fremmant flagg, tá tað verður gjørt fyri at sleppa undan at halda ásetingar fyri fiskastovnar.
- Hava eftirlit við rekgarnaveiðu á opnum havi.

Veðurlagsbroytingar fara helst at hava við sær at havið fer at fløða og kunnu elva til ógvislig árin á lágar oyggjar og strendur. Trygdartiltøk mugu tí verða sett í verk til at minka um vandan og avleiðingarnar av hesum. Longu nú býr góður helmingur av okkum styttri enn seksti kilometrar frá sjóvarmálanum, og helst verða vit tríggir fjórðingar innan ár 2020.

## 5.10 Fyrisiting og verja av vatntilfeingi

Vatn er alneyðugt sum drekkivatn og fyri reinføri, landbúnað, ídnað, býarmenning, vatnorku, fiskiveiðu, flutning, frítíð og annað virksemi okkara.

Mangastaðni í heiminum trýtur vatn í stórum, og vatntilfeingið verður spakuliga týnt og dálkað. Orsøkirnar eru t.d., at skarnrennur og burturkast frá ídnaði verða ov illa reinsað, at natúrligar vatnkeldur fara fyri skeytið, at ov nógvur skógur verður høgdur, og at týningarevni og onnur evni frá landbúnaðinum renna í áirnar. Byrgingar, umlagdar áir og vætuskipanir ávirka eisini vatndygd og vatnnøgd, og alt hetta er til ampa fyri feskvatnvistskipanir og lívið í teimum.

Vatn hevur alt at siga fyri landbúnaðin og tískil grøðina, men vætuskipanir eru merktar av vatn mangli og saltrúgving, sum ger -at jørðin fruktar minni.

Nógvir skeivleikar standast eisini av eini menningargongd, sum er ring fyri umhvørvið. Teir standast av, at fólk sær ikki, hvussu týðandi vatntilfeingið er, og tí eisini vantar frálæru í, hvussu ein kann verja tað. Yvirhøvur veit fólk ov lítið um, hvussu ólíkt ymsir menningarvegir fara við vatntilfeingi.

Í fátækralondum tørvar triðjahvørjum fólki reint vatn og reinførisútbúnað, sum eru grundleggjandi treytir fyri góðari heilsu og virðileika millum manna. Mett verður, at 80% av øllum sjúkum og 30% av øllum deyða í hesum londum standast av eitraðum drekkivatni.

Enn er óvist, hvussu veðurlagsbroytingar fara at gera um seg, men greitt er, at heitari og turrari veður fer at gera vatntrotið upp aftur størri sumstaðni.

Aðrastaðni kann meiri avfall elva til vatnflóð. Fær eitt heitari veðurlag havið at fløða, so kann salt seta inn í ósar og vatnrík strandarøki, og lágar oyggjar og strendur kunnu floyma yvir. Í yvirlýsingini frá aðru veðurlagsráðstevnuni verður fastsligið, at *"ein møgulig avleiðing av slíkum veðurlagsbroytingum kann gera umhvørvinum størri skaða, enn vit duga at ímynda okkum... ...og kann taka lívstreytir frá fólki, sum býr í summum lágum oyggjalondum, við lágar strendur og í turrum ella turrligum økjum."*

Tá ið talan er um so nógvar ymiskar vandar, mugu vit fáa skil á, hvussu øll kunnu fáa nóg mikið av reinum vatni. Til tess mugu vit laga virksemi okkara eftir avmarking náttúruna, so at vit verja góðar og vælvirkandi vistskipanir.

Rætti vegurin at fáa øllum reint vatn og reinførisútbúnað er at hugsa, at betur er at geva øllum nakað enn nøkrum alt. Ein líkinda háttur at nøkta vatntørvin nú og framyvir er at menna ódýra og hóskandi útgerð, sum lokalir smiðir kunnu seta upp og røkja.

Betri umsiting av vatntilfeingi krevur nýggja tøkni, og at bøtt verður um ta verandi. Betri umsiting krevur eisini, at tilfeingið verður nýtt til fulnar og ikki verður dálkað. Londini mugu tískil gera slíka umsiting til fastan tátt í búskaparpolitikki og almannapolitikki sínum. Uppi í hesum er økisnýtsla, skógarumsiting og verja av líðum og áarbakkum.

Økismyndugleikar eiga sjálvir at standa fyri sum mest av hesi umsiting, og allir partar av almenninginum eiga at sleppa upp í part, eisini upprunafólk, kvinnur og ungdómur.

Eitt hóskandi mál at seta sær er, at øll skulu hava vatn innan 2025. Tað gerst við at menna ódýra útgerð, sum lokalir smiðir kunnu gera og røkja.

Fyribilsmálini eru:

- Tryggja býarfólki minst 40 litrar av reinum drekkivatni í part um dagin.

- Tryggja 75% av býarfólki reinførisútbúnað.
- Gera fastar mannagongdir fyri, hvussu burturkast frá húsum og ídnaði verður handfarið og burturbeint.
- Savna og endurnýta 75% av øllum vanligum burturkasti í býum, ella skipa fyri umhvørvisbetri viðgerð.
- Tryggja bygdarfólki reint vatn og reinførisútbúnað, samstundis sum at bygdarumhvørvið verður varðveitt.
- Fáa tamarhald á sjúkum, sum stava frá skitnum vatni, og serliga royna at basa tropusjúkum.

Ymiskt liggur á láni til tess at fáa nóg mikið av vatni og góð reinførisviðurskifti:

- Neyðugt er við gjøllari vitan um mongd og dygd á tí vatni, sum verður tøkt til at nøkta vaksandi tørvin hjá fólki og búskapi. Vatngranskingini nýtist bæði pening og serkunnleika.
- Í umsitingini av vatntilfeingi má ansast eftir, at vatnvistskipanir verða varðveittar. Her eigur fyrivarnisreglan at verða nýtt, og málið er at minka og fyribyrgja dálking.
- Lond eiga at skráseta og verja vatntilfeingið og at vatnveitingin verður skipað burðardygg. Tørvur er á munagóðum tiltøkum og eftirlitsskipanum til tess at dálka minni. Serligur tørvur er á hóskandi tøkni til reinførisútbúnað og ruskhandfaring í tættbygdum fátækraøkjum.
- Árinsmetingar eiga at vera kravdar í øllum størri ætlanum um vatntilfeingi, har vandi kann verða fyri vatndygd ella vistskipan.
- Neyðugt er at menna nýggjar hættir at útvega reint vatn. Hetta kann t.d. vera við úrsaltan, regnsavnan – serliga í smáoyggjum – og endurnýtsla av vatni og spillvatni. Slíkar ætlanir mugu nýta ódýra tøkni, so at hon er keypandi hjá fátækralondum.
- Í øllum ætlanum um vatntilfeingi er at hava ans fyri grundleggjandi tørvinum hjá fólki og vistskipanum. Harafturat eigur brúkarin at rinda fyri ein part av útreiðslunum til tænasturnar.
- Ein fyritreyt fyri burðardyggari umsiting av lítlum og viðkvæmum vatntilfeingi er skyldan at vita, hvussu nógv vatn, ið ein og hvør verkætlan skal nýta, og hvussu nógv tað kostar.
- Lond mugu verja allan skóg nærindis vatnkeldum og avmarka vatndálking frá landbúnaði.
- Fiskiveiða í vøtnum eigur at verða umsitin soleiðis, at hon er umhvørvisvinarlig og gevur mestan mat. Fiskiveiða og aling eiga at fara væl við vatnvistskipanum.
- Húsdjórahald krevur nóg mikið av vatni og má vatnið verjast ímóti dálking frá tøðum.
- Árinsmetingar eiga altíð at verða gjørdar, tá ið ætlanir eru um nýggjar vætuskipanir.




Kelda: WRI, 2003

Heiminum tørvar útbúnum fólki, sum kann menna og meta um vatnveitingar, og sum duga at umsita slíkar ætlanir burðardyggt.

Serliga fátækralondum nýtist tøkni, so at tey sjálvi kunnu meta um vatntilfeingi sítt.

## 5.11 Trygg nýtsla av eiturevnum

Eiturevni verða nýtt um allan heim og eru neyðug til at røkka sosialum og búskaparligum málum. Meira má kortini verða gjørt til at minka um tey árin, ið slík evni hava á heilsu og umhvørvi.

Nøkur av heimsins størstu ídnaðarøkjum eru so illa dálkað av kemikalium, at tað hevur verið til bága fyri heilsu, arvaeginleikar og gitnaðarføri. Harafturat fer dálkingin við tíðini eisini at ávirka luft og veðurlag. Handlað verður við vandamiklum og eitrandi evnum, sum eru forboðin í summum londum, men sum ofta verða seld í øðrum londum í staðin – serliga fátækralondum.



Kelda: UNEP, 2003

Um 100.000 kemisk evni eru til , og 1.500 teirra standa fyri góðum 95% av heimsframleiðsluni. Fyri fleiri av hesum 1.500 evnum vanta umráðandi upplýsingar fyri, hvussu tey fara við heilsu og umhvørvi.

Kemisk evni kunnu verða nýtt bæði trygt og bíliga, men nógv lond – serliga fátækralond – fara ikki nóg væl um tey. Tí er neyðugt at menna og samstarva um mannagongdir fyri, hvussu mett verður um vandarnar við slíkum evnum.

Til ber eisini at minka um vandan við minni eitrandi evnum ella ókemiskari tøkni. Stjórnir eiga at umhugsa at forbjóða evnum, sum í síni tíð vórðu góðkend út frá umstøðum, sum neyvan eru longur. Heldur skal verða mælt til at nýta aðrar týningarhættir, t.d. lívfrøðiligar.

Ídnaðurin eigur at:

- Gera altjóða grundreglur fyri, hvussu til ber at savna upplýsingar um vansar og umhvørvisvinarliga burturbeining.
- Fylgja leiðreglunum um, at økissamfeløg hava rætt til upplýsingar. Hetta merkir, at upplýsingar um eitrandi lekar og útlát skulu vera tøkir hjá økissamfeløgum.
- Tryggja, at umsitingin av eiturevnum verður eins í øllum londum.

Í løtuni eru ongar heimsavtalur um handil við vandamiklum ella eitrandi evnum. Myndugleikar eiga at hava eftirlit við útflutningi av ólógligum evnum ella slíkum, sum avmarkingar eru settar á, og teir eiga at lata innflutningslandi allar upplýsingar um flutningin.

## 5.12 Fyrisiting av vandamiklum burturkasti

Vandamikið burturkast verður alt vanligari. Hetta ávirkar heilsu og umhvørvi, men fleiri lond hava ikki royndirnar at handfara trupulleikan.

Í øllum landsumhvørvisætlanum eiga myndugleikar at seta sær eitt mál fyri at minka um vandamikið burturkast. Tørvur er á tiltøkum, sum kunnu staðfesta og minka um burturkastið og vandarnar av tí, og sum kunnu gera sítt til, at tað verður handfarið betur.

Av øllum ræður um at broyta mannagongdir í ídnaðinum. Hetta merkir, at mát eiga at verða sett fyri, hvussu nógv burturkast skal koma frá hvørji framleiddari eind. Stjórnir eiga at samstarva við ídnaðin um at fáa sum minst av vandamiklum burturkasti, og at so lítið verður latið í náttúruna, sum gjørligt. Ídnaðurin hevur ein avgerandi leiklut. Hann eigur at stuðla menningini av umhvørvisbetri tøkni og tryggja, at krøv um vandamikið burturkast eru eins í øllum londum.

Stjórnir eiga alt fyri eitt at staðfesta goymslur av vandamiklum burturkasti umframt tey øki, har fólk er fyri stórum vanda. Tær eiga at seta í verk fyribyrgjandi tiltøk og rudda dálkað øki.

Stjórnirnar eiga at:

- Krevja og stuðla at ídnaðurin mennir umhvørvisbetri framleiðslu- og endurvinningarhættir.
- Steðga mannagongdum, sum kunnu elva stóran skaða orsakað av vandamiklum burturkasti.
- Endurskoða verandi ídnað fyri at betra um handfaringina av vandamiklum burturkasti.
- Gera upplýsingarskrá fyri almenningin og tryggja, at fólk, sum starvast í ídnaðinum, kann fáa frálæru um

vandamikið burturkast – serliga, hvussu minkað verður um tað.
- Byggja støðir at taka ímóti vandamiklum burturkasti, antin talan er um landsstøðir ella økisstøðir. Ídnaðurin eigur at viðgera og goyma burturkastið á sama stað ella nærindis, haðani tað er framleitt.

Stjórnir skulu vissa seg um, at herurin ger eftir landsins reglum fyri, hvussu vandamikið burturkast verður handfarið og goymt.

Ídnaðarlond eiga at stuðla upp undir, at fátækralond kunnu ogna sær umhvørvisgóða tøkni - eisini vitan um hesa tøkni og bestu framleiðsluhættir.

## 5.13 Fyrisiting av burturkasti og spillivatni

Tað skjótt vaksandi burturkastið og spillvatnið frá býum er eisini vandamiki fyri heilsu og umhvørvi. Hvørt ár doyggja 5,2 milliónir fólk - teirra millum 4 milliónir børn - av sjúkum, sum koma av skeivari handfaring av burturkasti og spillvatni. Burturkast frá býum dálkar jørð, luft og vatn víða um.

Í fátækralondum viðgera tey minni enn 10% av slíkum burturkasti, og bert lítil partur av viðgerðini lýkur basal krøv. Yvir tvær milliardir fólk hava ikki vanligan reinførisútbúnað, og helmingurin av býarfólki í fátækralondum sleppur ikki av við burturkast á hóskiligan hátt.

Nýtsla ið ikki er burðardygg – serliga í ídnaðarlondum – gerst alt vanligari, og burturkastið økist bæði í nøgd og slag. Í 2025 er tað kanska fýra- ella fimmfaldað. Ruskstøðir fyllast, og alt meiri peningur fer til at viðgera burturkast, serliga í ídnaðarlondum. Avgjøld á burturkasti skal tryggja at framleiðarin gjaldar fyri burturbeining. Tá fara endurvinning og endurnýtsla at standa seg betri.

Best er kortini at sleppa undan burturkasti. Til tess krevst, at vit broyta lívsstíl, framleiðslu- og nýtsluháttir. Landsætlanir eru neyðugar fyri at tryggja, at so lítið verður av burturkasti, sum gjørligt, at tað verður endurvunnið og endurnýtt, savnað og viðgjørt væl. Harafturat eiga eftirlitsskipanir at verða gjørdar í samstarvi við økismyndugleikar, vinnulív, privatar felagsskapir og brúkarabólkar.

Ídnaðarlond eiga at leggja ætlanir, sum skulu fáa mongdirnar á burturkasti í fasta legu ella minka um tær. Fátækralond eiga at arbeiða fyri sama máli, tó so at tað ikki hindrar teimum at mennast.

Stjórnir eiga at stuðla endurnýtslu. Tær mugu fíggja ætlanir, har royndir verða gjørdar við t.d. sankutøðum[17], vætuskipanum við spillvatni, orku frá burturkasti og við heimayrki, sum er grundað á endurnýtslu. Stjórnir eiga at gera leiðreglur fyri, hvussu burturkast verður endurnýtt, og tær eiga at stimbra marknaðir fyri endurnýtsluvørur.

Útbúgving, tillagingar og fíggjarstuðul eru eisini neyðug fyri at eggja ídnaðinum til at broyta vørur sínar og at minka um burturkastið. Tey eru eisini neyðug fyri at eggja ídnaði og brúkarum til at nýta endurnýtslutilfar, sum fer væl við umhvørvinum.

[17] øll onnur tøð enn mykjutøð

## 5.14 Fyrisiting av geislavirknum burturkasti

Stórur skaði kann standast av geislavirknum burturkasti, og tí er altumráðandi at handfara tað rætt.

Geislingarvandin er ymiskur. Lággeislavirkni er rímiliga trygt, men hágeislavirkni er hinvegin lívshættisligt. Hvørt ár koma 200.000 rúmmetrar av lággeislavirknum evnum frá kjarnorkuverkum og 10.000 rúmmetrar av hágeislavirknum evnum og brúktum kjarnorkubrennievni. Mongdirnar vaksa, alt sum kjarnorkuverkini gerast fleiri.

Geislavirkin evni í heilivági, gransking og ídnaði hava nógv minni burturkast við sær – nakrar tíggju rúmmetrar um árið fyri hvørt land, men tað gerst vanligari at nýta hesi evni. Og mongdin verður hareftir. Strangt eftirlit er neyðugt fyri at tryggja, at skaði stendst ikki av.

Lond eiga at samstarva við altjóða stovnar fyri at:

- Avmarka framleiðslu av geislavirknum burturkasti sum mest.
- Stíla fyri, at slíkt burturkast verður goymt, handfarið, flutt og fyribeint á tryggan hátt.
- Veita fátækralondum tøkni, so at tey fáa viðgjørt burturkastið, ella gera tað lættari hjá hesum londum at lata evnini inn aftur til veitaran, tá ið tey eru brúkt.
- Stuðla góðari ráðlegging fyri at fáa trygga og umhvørvisgóða handfaring av geislavirknum burturkasti.
- Skipa fyri umhvørvisárinsmetingum, um til ber.
- Styrkja um arbeiðið at gera reglusavn um millumlandaflutning av geislavirknum burturkasti. Umhugsað eigur at verða at fáa í lag bindandi avtalu um hetta.

- Skipa fyri at verandi, sjálvbodni steðgurin at søkkja låggeislavirkið burturkast í havið verður avloystur av forboði.
- Forða fyri, at geislavirkið burturkast verður goymt ella fyribeint við strendur ella úti á havi, um trygd ikki er fyri, at tað er ikki til órímiligan ampa fyri fólk og havumhvørvi.
- Sleppa undan, at geislavirkið burturkast verður flutt í lond, sum forbjóðað slíkum innflutningi.

Fíggingar- og útbúgvingarmøguleikar mugu standa í boði hjá teimum fátækralondum, sum hava kjarnorku.

Dýrt er at umsita og goyma geislavirkið burturkast, men útreiðslurnar valdast eisini ta tøkni, ið nýtt verður.

# 6. UMRÁÐANDI SAMSTARVSFELAGAR

Stjórnirnar eru samdar um mong mál og mangar mannagongdir í Agendu 21. Til tess at fremja hesi mál krevjast kortini ábyrgd og stórur áhugi hjá øllum samfelagsbólkum. Skal menningin yvirhøvur verða burðardygg, mugu allir partar av almenningunum vera við, og politikarar mugu vísa ábyrgdarsemi.

Einstaklingar, bólkar og feløg mugu hava kunnleika til menning og umhvørvi og vera við til at taka avgerðir – serliga tær, sum hava við egna øki teirra at gera.

Skal fólk kunna taka avgerðir á góðum grundarlagi, eiga stjórnir at upplýsa um øll viðkomandi menningar- og umhvørvismál. Upplýst skal t.d. verða um vøru ella virksemi, sum ávirkar ella væntandi fer at ávirka umhvørvið. Upplýst skal eisini verða um umhvørvisverndartiltøk.

Í Agendu 21 verður m.a. greitt frá, hvat neyðugt er at gera, serliga hjá stjórnum, til tess at styrkja samstarvið við umráðandi samstarvsfelagar, so at menningin kann gerast betri.

## 6.1 Leikluturin hjá kvinnunum í burðardyggu menningini

Kvinnur hava drúgvar royndir at umsita og varðveita náttúrutilfeingi. Hóast tað hevur leikluturin hjá kvinnunum í mennigarmálum verið avmarkaður, bæði tí at mismunur verður gjørdur á, og tí at kvinnur hava ikki somu møguleikar at fáa sær ogn, útbúgving og arbeiði sum menn. Stjórnir eiga tí at umhugsa menningarætlanir, sum taka burtur allar stjórnarligar, rættarligar, umsitingarligar, mentanarligar, fíggjarligar, atferðarligar og sosialar forðingar fyri, at kvinnur fult og heilt kunnu vera við í almennum virksemi og burðardyggari menning.

Tal av kvinnum í mun til tal av monnum (%)
í parlamentum
2000




Kelda: UNIFEM, 2003

Lond eiga at fáa fleiri kvinnuligar avgerðartakarar, ráðleggjarar, granskarar, lærarar, leiðarar og ráðgevar í menningar- og umhvørvismálum. Neyðugt er at læra fleiri kvinnur at lesa, at tryggja gentum atgongd til allan skúla, og at geva kvinnum betri møguleikar fyri hægri lestri í tøkni og náttúruvísindum.




Fyri at geva gentum og kvinnum betri møguleikar at vera við í burðardyggu menningini, eiga stjórnir at:

- Tryggja leiklutin hjá kvinnum í vistskipanarumsiting og í umhvørviseftirliti, bæði innanlands og í altjóða høpi.
- Tryggja kvinnum víðfevnda heilsurøkt, ið t.d. skal fevna um gitnaðarkanning, bróstageving, barnaheilsu, burðaravmarking og foreldraábyrgd.
- Samstarva við arbeiðisgevarar og ymsar felagsskapir um ódýrar vøggustovur og barnagarðar, so at lætt verður um arbeiðsbyrðuna hjá kvinnum, bæði í og uttanfyri heimi.
- Gera landsætlanir fyri, hvussu menn kunnu taka sín part av húsligum arbeiði.
- Bjóða kvinnum betri lánsmøguleikar av øllum slag
- Tryggja at kvinnur hava møguleika fyri ognarætti, bæði til amboð og rávørur í landbúnaðurin.
- Taka øll neyðug stig til at sleppa undan harðskapi móti kvinnum og arbeiða fyri at steðga niðrandi áskoðan og fordómar um tær.
- Menna brúkaratilvitið hjá kvinnum fyri at minka um ella fáa burtur nýtslu, ið ikki er burðardygg, serliga í ídnaðarlondum. Hetta fer at eggja framleiðarum til at gera umhvørvisbetri vørur.
- Rokna virðið á óløntum arbeiði, t.d. húsligum arbeiði, við í tjóðarroknskapin.

# 6.2 Leilutur hjá børnum og ungum í burðardyggu menningini

Børn og ung telja knappan triðing av heimsins fólki, og tey eiga at fáa høvi at taka avgerðir um framtíð sína. Teirra virkni lutur í umhvørvisvernd og í avgerðum um menning og umhvørvi er treyt fyri, at tað skal eydnast at fremja Agendu 21 í verki.

Menningarætlanir eiga at veita børnum og ungum eina trygga framtíð við útbúgving, arbeiði, góðum lívskorum og reinum umhvørvi.

Skúlin eigur at vera somikið góður allastaðni, at meira enn helmingurin av øllum ungdómi sleppur í miðnámsskúla ella í læru. Í allari útbúgvingartíðini eigur at verða lært um burðardygga menning og umhvørvi.




Stjórnir eiga at lurta eftir teimum ungu í umhvørvismálum, og tey eiga at sleppa at vera við í viðkomandi avgerðum. Ung eiga eisini at vera umboðað á altjóða fundum og skulu vera við í avgerðargongdini í ST.

Í mongum fátækralandi eru børn og ung næstan helmingurin av fólkinum. Børn, annaðhvørt tey búgva í ídnaðarlondum ella í fátækralondum, eru sera viðkvom fyri avleiðingunum av umhvørvistýning.

Londini eiga at steðga mannarættindabrotum og ágangi móti ungum – serliga ungum kvinnum og gentum. Stjórnir mugu hugsa um børnini, at tey eru frísk, fáa nóg mikið at eta, sleppa í skúla og verða vard móti dálking og eiturevnum. Í menningarætlanum eigur dentur at verða lagdur á, at børn og ung eiga sín lut í náttúrutilfeinginum.



# 6.3 Leikluturin hjá upprunafólkinum

Stórur partur av heimsins fólki er upprunafólk. Vælferð tess er treytað av varandi tilfeingi og vistskipanum.

Gjøgnum fleiri ættarlið hevur upprunafólkið ment eina siðbundna og vísindaliga heildarvitan um egið umhvørvi og tilfeingi. Møguleikar tess fyri burðardyggari menning hava tó verið avmarkaðir av fíggjarligum, sosialum og søguligum ávum. Stjórnir eiga at viðurkenna, at neyðugt er at verja landøki hjá upprunafólki fyri virksemi, sum kann elva til umhvørvisligar, sosialar ella mentanarligar trupulleikar. Stjórnir eiga at gera mannagongdir fyri, hvussu trætur um búseting og tilfeingi verða loystar.

Upprunafólk eiga at krevja betri eftirlit við egnum landøki, og sjálvi at umsita tilfeingi sítt. Upprunafólkið eigur at vera við í avgerðum í viðkomandi menningarspurningum, og somuleiðis í avgerðum um friðað øki. Stjórnir eiga at arbeiða rættindi og skyldur hjá upprunafólki inn í landsins lóggávur. Lond kunnu eisini samtykkja lógir og reglur, sum varðveita siðvenju og ræðisrætt hjá upprunafólki á øllum økjum.

Upprunafólk eigur at fáa sín virkna lut, tá ið lógir og reglur verða gjørdar fyri tilfeingisumsiting og menningargongdir, sum viðkoma tí og áhugamálum tess. Stjórnir og altjóða felagsskapir eiga at viðurkenna tey virði, ta hevdbundnu læru og teir arbeiðshættir, sum upprunafólk nýtir at umsita umhvørvið. Hesin kunnleiki eigur at verða førdur yvir á onnur øki, sum eru í menning. Upprunafólk eigur at verða stuðlað við hóskandi tøkni, so tað fær umsitið tilfeingi sítt betri.







Kelda: K. Marston, 2002

## 6.4 Samstarv við sjálvbodnum felagsskapum (NGO)

Sjálvbodnir felagsskapir eru umráðandi, tá ið talan er um at skapa og fremja fólkaræðisligar grundreglur. Stóri fyrimunurin hjá slíkum felagsskapum er, at teir eru leysir av stjórnum og øðrum myndugleikum. Harumframt hava sjálvbodnir felagsskapir eina breiða og holla vitan á økjum, sum eru neyðug fyri at fremja eina umhvørvisliga og sosialt burðardygga menning.

Tí eigur altjóða netverkið av sjálvbodnum felagsskapum at verða viðurkent og stuðlað sum ein samstarvsfelagi í arbeiðinum at útinna Agendu 21. Felagsskapirnir kunnu gerast samfelagnum hollir stuðlar í royndum tess at semjast um, hvussu ein kann steðga menningarhættir sum ikki eru burðardyggir.

Bæði ST og stjórnirnar eiga at bjóða sjálvbodnum felagsskapum við í arbeiðið at gera reglur og at taka avgerðir um burðardygga menning. Teir eiga eisini at vera við til at meta um gongdina at fremja Agendu 21. Felagsskapirnir skulu so tíðliga sum til ber fáa atgongd til neyðugar upplýsingar. Stjórnir mugu eggja til samstarv millum sjálvbodnar felagsskapir og økismyndugleikar.

ST eigur at síggja til, at allar undirdeildir tess gagnnýta servitanina hjá sjálvbodnum felagsskapum. ST eigur at almennakunngerða ein frágreiðing um fíggjarliga og umsitingarliga stuðul sín til hesar felagsskapir fyri at styrkja støðu teirra sum samstarvsfelagir.

Stjórnir eiga at fáa sjálvbodnar felagsskapir við í ætlanir sínar við at gagnnýta førleika teirra á t.d. útbúgvingarøkinum, fátækraøkinum og umhvørvisøkinum. Úrslitið eigur at verða nýtt av stjørnum í politiskum ætlanum fyri burðardygga menning.

Øll lond noyðast at veita sjálvbodnum felagsskapum trygd fyri, at teir kunnu stovna ráðgevandi bólkar. Stjórnirnar noyðast eisini at gera lógir, sum heimila hesum felagsskapum at leita til dómstólar fyri at verja áhugamál hjá almenninginum.

Sjálvbodnir felagsskapir, serliga í fátækralondum, hava tørv á munandi meiri stuðli fyri at kunna geva sítt íkast til burðardygga menning og fyri at kunna meta um, hvørgi framstig verða gjørd í arbeiðinum at útinna Agendu 21.

## 6.5 Økismyndugleikar

Fleiri av teimum trupulleikum og loysnum, sum nevnd eru í Agendu 21, stava frá lokalum virksemi. Tí hava økismyndugleikar ein høvuðsleiklut í arbeiðinum fyri burðardyggari menning.

Økismyndugleikar, t.d. kommunustýri, byggja og røkja vegir og drekkivatnsskipanir, teir hava eftirlit við bygging og ídnaði, skipa fyri umhvørvispolitikkinum í sínum øki og eiga sín part av landsumhvørvispolitikkinum.

Økismyndugleikar eru tað stýrisamboð, sum er fólkinum næst. Teir hava tí nógv at siga, tá ið talan er um at útbúgva og savna fólk um burðardyggu menningina. Allir økismyndugleikar eiga í samstarvi við borgarar sínar at gera eina lokala Agenda 21 ætlan.

Starvsfólk í økisumsitingum eigur at ráðføra seg við íbúgvar, feløg og vinnulív fyri at leggja lunnar undir eina semju um, hvussu økini best fremja burðardygga menning. Hetta fer at lætta um hjá starvsfólkinum at laga lógir og aðrar økisætlanir til Agendu 21. Tá verður fólkið eisini meira tilvitið um menningina.

Økisarbeiðið eigur at verða knýtt upp í altjóða arbeiðið, so at fólk kann geva hvørt øðrum upplýsingar, hugskot og vitan. Ymiskir stovnar, t.d. ST-stovnurin fyri búseting, (eisini nevndur UNCHS[18]), eiga at savna saman upplýsingar um økisætlanir. Stuðul eigur eisini at verða givin frá ymsum verkætlanum hjá ST, t.d. menningarverkætlanini, UNDP[19], umhvørvisverkætlanini, UNEP[20], umframt frá Heimsfelagsskapinum fyri økismyndugleikar, IULA[21], og Heimsfelagsskapinum fyri stórbýir, WAMM[22].

[18] United Nations Centre for Human Settlements
[19] United Nations Development Programme
[20] United Nations Environment Programme
[21] International Union of Local Authorities
[22] World Association of the Major Metropolises

## 6.6 Verkafólk og verkafeløg

Verkafólk eru millum teirra, ið verða einamest ávirkað av teimum broytingum, sum eru neyðugar til tess at fáa burðardygga menning. Fyri verkafeløg eru vinnuligar broytingar ikki ókendar, og tískil eru tey ein týdningarmikil liður í menningararbeiðinum. Nøkur av hjartamálunum hjá verkafeløgum eru trygg arbeiðspláss, gott arbeiðsumhvørvi og varandi, sosial menning.

Stjórnir og vinnulív eiga at stimbra virkna leiklutin hjá verkafólki og verkafeløgum at gera og útinna umhvørvis- og menningarætlanir, bæði innanlands og í altjóða samanhangi. Hetta fer t.d. at ávirka arbeiðsskapandi politikk og menningarætlanir fyri vinnulív og arbeiðsmegi.

Málið er, at øllum skal standa í boði trygt og varandi arbeiði í einum burðardyggum arbeiðsumhvørvi. Bólkar eiga at verða skipaðir við verkafólki, arbeiðsgevarum og stjórnarumboðum at arbeiða við trygd, heilsu, umhvørvistilviti og burðardyggari menning.

Verkafeløg og arbeiðsgevarar eiga at menna ein felags umhvørvispolitikk og gera raðfestingar fyri, hvussu ein betrar arbeiðsumhvørvi og heildaravrik hjá vinnulívinum á umhvørvisøkinum. Verkafeløg eiga at menna ein politikk, sum strembar eftir ábyrgdarfullari menning, og gjørdar eiga at verða fleiri felags avtalur við sama endamáli.

Verkafólki tørvar meiri útbúgving og frálæru, bæði hvat viðvíkir arbeiðsskaðum, arbeiðstrygd og arbeiðsskapandi tiltøkum.

Fyri at fáa verkafólk at stuðla burðardyggari menning fult og heilt, eiga stjórnir og arbeiðsgevarar at stuðla tí í rætti sínum til frælsar felagsskapir og at skipa seg.

## 6.7 Handil og vinnulív

Ein ábyrgdarfull virkisleiðsla kann vera gull verd í arbeiði sínum at minka um burturkastið og at bøta um heilsu- og umhvørvisverndina og tilfeingisnýtsluna.

Umhvørvisstýring eigur at verða sett í fremstu røð, tí hon er fyritreyt fyri teimum broytingum, ið kunnu føra til burðardyggar framleiðsluhættir. Broytingarnar hava við sær, at vinnulívið noyðist at menna umhvørvisgóða tøkni og arbeiðshættir. Vøruprísir eiga at meira enn nú at endurspegla tær umhvørvisútreiðslur, ið standast av framleiðslu, nýtslu, endurnýtslu og burturkasti.

Summir vinnulívsleiðarar hava longu sett í verk vøru- og góðskustýring, tá ið ræður um tilfeingisumsiting og tilfeingisnýtslu. Teir tala fyri opinleika og samskifti við arbeiðsfólk og fjølmiðlar, -og teir skipa fyri umhvørvisgrannskoðan -og umhvørvismetingum, soleiðis sum lógir og reglugerðir áleggja teimum. Teir taka eisini sjálvir stig til, at virksemið hjá fyritøkum teirra fer væl við heilsu og umhvørvi.

Vinnulívið eigur at gera árligar frágreiðingar um umhvørvisstøðuna og orku- og tilfeingisnýtsluna. Vinnulívið eigur at samtykkja grundreglur fyri umhvørvisansi. Dømi um slíkar grundreglur kunnu vera sáttmálin hjá Altjóða handilskamarinum um burðardygga menning og skráin hjá kemiska ídnaðinum um umhvørvisábyrgd.

Stjórnir eiga at:

- Nýta fíggjarkarmar, lógir, krøv og betri umsiting til at fáa burðardygg virkir og reinari framleiðslu.
- Stíla fyri at stovna ein grunn, sum við váðafúsum peningi skal gera íløgur í burðardyggar menningarætlanir.
- Samstarva við vinnulív, útbúgvingarstovnar og altjóða felagsskapir um at skipa fyri umhvørvisfrálæru fyri vinnulívsleiðarar.

Vinnulívið eigur at:

- Menna rakstrarhættir og vørur, sum eru umhvørvisvinarligar.
- Tryggja ábyrgdarfullar og umhvørvisgóðar vørur og mannagongdir.
- Geva samstarvsfeløgum í fátækralondum høvi at keypa umhvørvisgóða tøkni fyri rímiligan penga.
- Eggja øllum deildum sínum at tillaga mannagongdir sínar, so at fyrilit verður tikið fyri umhvørvinum. Økismyndugleikarnir eiga at fáa innlit í upplýsingar.
- Fáa í lag samstarvsskipanir til at hjálpa fólki í smáfyritøkum at læra seg handilshegni.
- Seta á stovn landsráð fyri burðardygga menning í vinnulívinum.
- Økja um granskingina og menningina av umhvørvisvinarligari tøkni og umhvørvisumsiting.

Handil og vinnulívið, eisini fleirtjóða fyritøkur og feløg teirra, hava ein altumvarðandi leiklut, og hann er at hjálpa heiminum at røkka málunum í Agendu 21.

## 6.8 Granskarar og tøknifrøðingar

Tað hevur nógv at týða, at ein og hvør skilir lutin hjá granskingini og tøknini í umhvørvisvernd og í egnu menning okkara.

Betri samskifti er neyðugt, so at avgerðartakarar kunnu fáa atgongd til tøka vitan, so til ber at leggja ráðiligar ætlanir um burðardygga menning. Betri samskifti hjálpir granskarum og tøknifrøðingum at gera raðfestingar og uppskot um, hvussu vit greiða álvarsamar trupulleikar. Betri samskifti má eisini vera millum granskarar og almenning, so at politisk tiltøk miða eftir tí, sum liggur almenninginum á hjarta.

Tað liggur serliga á granskarum og tøknifrøðingum at útvega upplýsingar um og at hjálpa til við at verja umhvørvið. Verkfrøðingar, arkitektar, vøruskaparar, býarskiparar og onnur útbúgvin fólk eiga at gera leiðreglur, sum hóva saman við umhvørvisvernd og tørv okkara. Hesar leiðreglur skulu vera sum varðar, ið vísa okkum á, hvussu vit eiga at virða heimsins vistskipanir. Samfelagið yvirhøvur má kortini taka undir við hesum leiðreglum, um tær skulu muna nakað.

Stjórnir eiga at:

- Fáa greiðu á, hvussu vísindaligar og tøknifrøðiligar landsverkætlanir kunnu stuðla upp undir burðardygga menning.
- Bera so í bandi, at granskarar og avgerðartakarar lata hvør øðrum allar viðkomandi upplýsingar. Tørvur er á landsfrágreiðingum, sum eru lættskiljandi og viðkomandi, tá ið talan er um burðardygga økismenning.

Onnur tiltøk kunnu vera at:

- Seta landsráðgevingarbólkar til at hjálpa granskarum og samfelagnum sum heild at menna felags umhvørvisvirði.
- Gera umhvørvis- og menningarvirði til fastar tættir í útbúgvingum, og geva hesum virðum betri rúmd í granskingini.

## 6.9 Leikluturin hjá bóndum

Triðingurin av øllum landøki verður nýttur til landbúnað, og landbúnaður er høvuðsstarv hjá nógvum okkara. Upprunafólk og húski hava umsitið sera stóran part av jarðartilfeinginum.




Kelda: FAO, 2003

Landbúnaður, herundir fiskivinna og skógarvinna, tolir ikki misnýtslu, og at økir verða illa umsitin. Alsamt størri ivi er um, hvussu burðardyggir veltingarhættirnir í landbúnaðinum eru. Seinastu tríati árini er grøðin vaksin heilt nógv, men sumstaðni er fólkatalið vaksið upp aftur meira. Uttanlandsskuld og rávøruprísir hava ikki verið bóndum til vildar, og harafturat hava bóndur í fátækralondum avmarkaða atgongd til tilfeingi og arbeiðstól.

Fyri at menna góðar landbúnaðarætlanir eiga stjórnir at samstarva við bæði innlendis og altjóða granskingardeplar og privatar felagsskapir um at:

- Menna mannagongdir og tøkni, sum økja um grøðina, varðveita dygdina á jørðini, endurnýta tøðevni, spara orku og vatn og týna skaðadýr og ókrót.
- Stuðla bóndum til at tosa sínámillum um, hvussu ein best verjir vatn-, jarðar- og skógartilfeingi, nýtir týningarevni og minkar um ella endurnýtir burturkast.
- Fáa bóndur at verða sjálvbjargnar við orku við at eggja teimum til at nýta orkulítlar veltingarhættir sum t.d. teir aldargomlu hættirnar hjá upprunafólki.
- Stuðla granskarum, sum royna at vita, hvussu ein best gagnnýtir arbeiðsmegi hjá fólki og fenaði.

Fyri at eggja bóndum til at umsita tilfeingið burðardygt, eiga stjórnir at lata teimum meiri vald og meiri ábyrgd. Stjórnir mugu eggja fólki til at fara betur við jørðini. Hetta gerst t.d. við at geva bóndum ognarrætt á tí jørð, teir umsita, og við at geva teimum betri møguleikar fyri fígging, tøkni og útbúgving.

Granskarar mugu menna umhvørvisgóðar veltingarhættir, og landbúnaðarskúlar mugu gera vistfrøði til fasta læru í útbúgvingi. Vøruprísir mugu endurspegla umhvørvisútreiðslur, og prísskipan, handilspolitikkur og landbúnaðarstuðul eiga at eggja til munagóða og burðardygga tilfeingisnýtslu.

# 7. ÍVERKSETING

## 7.1 Fígging av burðardyggu menningini

Nógvur peningur skal til, um vit skulu vinna á mál við Agendu 21, sum londini samtyktu í Rio. Londini sjálvi skulu rinda meginpartin, bæði ígjøgnum tað almenna og ígjøgnum vinnuna. Fleiri fátækralondum tørvar kortini bæði pening og tøkni, til at tey kunnu loysa grundleggjandi menningarmál og stórar, altjóða trupulleikar viðvíkjandi veðurlagi og lívfjølbroytni.

Fátækralondum nýtist at stimbra egnan búskap og sosiala menning, umframt at tey mugu fáa bilbugt við fátæktini. Hetta eru fortreytir, um vit skulu fáa burðardygga menning allastaðni.

Tað fer at gagna bæði okkum og eftirkomarum okkara, at vit veita fátækralondum ta hjálp, teimum nýtist. Tað kan koma at kosta okkum líka nógv ikki at gera tað, sum tað fer at kosta at seta Agendu 21 í verk.




Skulu fátækralond fáa burðardygga menning, mugu tey greidliga raðfesta, hvat teimum tørvar.. Ídnaðarlondini eiga at binda seg til hesar raðfestingar. Hugsa vit um tær stóru útreiðslur, ið talan er um, er umráðandi, at ídnaðarlond lata fátækralondum meiri pening at ráða yvir.

Ídnaðarlond binda seg framvegis til at røkka málinum hjá ST um at lata 0,7% av bruttotjóðarúrtøkuni í almennari menningarhjálp. Tey lond, sum longu hava rokkið hesum máli, verða eggjað til at halda á og ikki at slaka.

Stórir, altjóða felagsskapir so sum Altjóða menningarfelagsskapurin, (IDA[23]), økismenningarbankar og Altjóða umhvørvisgrunnurin hjá ST, (GEF[24]), eiga at vera somikið lagaligir, at teir kunnu hjálpa fátækralondum við teimum eykaútreiðslum, ið skulu til fyri at fremja Agendu 21. Menningarverkætlanin hjá ST, (UNDP), eigur at fáa neyðugan styrk til at hjálpa londunum at ogna sær tað hegni og tann kunnleika, sum neyðug eru til tess at fremja burðardygga menning.

Heimurin má hjálpa londum við lítlum og miðallítlum inntøkum at greiða trupulleikar teirra av stórari uttanlandsskuld, so at tey hava tøkan pening til burðardygga menning. Fátækralondum nýtist eisini fleiri íløgur uttaníffrá og umhvørvisbetri tøkni. Til tess er at føra ein landspolitikk, sum stuðlar íløgum og eggjar til handilsfelagsskapir millum feløg í og uttanfyri landinum. Fátækralondum nýtist fríhandil og marknaðaratgongd fyri at fáa ein búskaparvøkstur, sum ger tey før fyri at skapa burðardygga menning.

Neyðugt er at veita sjálvbodnum felagsskapum almennan stuðul. Peningur

[23] International Development Association
[24] Global Environment Facility

kann eisini fáast til vegar við at taka nakað burtur av tí, sum nú fer til hernaðarmál.

## 7.2 Flutningur av tøkni

Øll lond tørva umhvørvisvinarliga tøkni til tess at fáa burðardygga menning, umframt at teimum tørvar meiri útbúgvið fólk at handfara slíka tøkni. Umhvørvisvinarlig tøkni er ikki bara maskinur og tað, sum melur, men eisini kunnleikin at nýta, røkja og menna hana. Harafturat krevst fyriskipanarligur og leiðsluligur dugnaskapur, um hon skal gagna fullvæl.

Serliga fátækralondum tørvar nýggja og munagóða tøkni fyri at fáa burðardygga menning, fyri at teljast sum samstarvsfelagar í heimsbúskapinum, fyri at verja umhvørvið, og fyri at hjálpa um fátæktina og fólksins líðingar. Nakað av verandi tøkni má gerast betri, og nakað má verða skift við nýggjari slag.

Tað hevur týdning at fátækralond sleppa framat tøknini, eisini fíggjar-, tøkni- og leiðslukunnleika fyri at kunna nýta og menna tøknina. Upplýst eigur eisini at verða um vansarnar við ymsari tøkni, so at londini kunnu velja sær ta røttu á røttum grundarlag. Hon má eisini samsvara við sosialar, mentanarligar og búskaparligar raðfestingar. Í summum førum kann tøkni sameinast við lokala nýskapan.

Stjórnir og altjóða felagsskapir eiga at stíla fyri, at fátækralond fáa umhvørvisgóða tøkni, sum er alment atgongd, ella sum ikki er vard av einkarrætti. Sum part av stuðlinum til burðardyggu menningina eiga stjórnir og altjóða felagsskapir at útvega sær einkarrættir og einkarloyvi á handilsligum grundarlagi at lata fátækralondum við ikki-handilsligum treytum. Tó eigur vitanareinkarrættur at verða vardur í slíkum førum.

Til at nýta umhvørvisvinarliga tøkni krevst ein skipað útbúgving av handverkarum, tøkningum, millumleiðarum, vísindafólki, verkfrøðingum og lærarum. Tørvur er á at útbúgva fólk, sum kunnu meta um og handfara tøkni og gera umhvørvisárinsmetingar. Lættari eigur at vera hjá serfrøðingum úr fátækralondum at vitja ella flyta heim aftur, um teir starvast í ídnaðarlondum. Tørvur er á fleiri altjóða deplum at veita serkøna hjálp í umhvørvisvinarligari tøkni, serliga á landbúnaðarøkinum, ídnaðarøkinum og orkuøkinum. Slíkir deplar kunnu eisini granska og eftirmeta tøkni, og í samstarvi við vinnulívið kunnu teir veita týðandi hjálp, tá ið talan er um menna, handfara og innflyta hana.

## 7.3 Vísindi og burðardygg menning

Vísindi kunnu stuðla upp undan skilagóðari umsiting av umhvørvinum og menningini fyri framtíð okkara á jørðini. Vísindafólk dugir betur at síggja vansarnar við veðurlagsbroytingum, øktari tilfeingisnýtslu, fólkatalsvøkstri og umhvørvistýning. Kunnleiki tess eigur at verða nýttur til at gera framskygdar ætlanir um burðardygga menning.

Stjórnir eiga at stuðla gransking, ið kann lýsa, hvussu umhvørvið virkar (arbeiðir), og hvussu væl jørðin tolir vaksandi tørv okkara. Granskarar kunnu fáa skil á, hvussu vit kunnu gagnnýta orku og tilfeingi betur í t.d. ídnaði, landbúnaði og flutningi.

Heiminum nýtist framskygdar vísindametingar um tilfeingisnýtslu, orkunýtslu, heilsu og fólkavøkstur. Slíkar metingar kunna nýtast, tá ið mett verður um umhvørvi og menning í einstøkum økjum og í heiminum øllum. Metingarnar skulu verða almannakunngjørdar og orðaðar soleiðis at øll kunna skilja tær.

Til gagns fyri burðardyggu menningina eiga londini at menna amboð sum t.d:

- Ávísar fyri lívsvirði, sum umfevna heilsu, útbúgving, sosiala vælferð, umhvørvi og fíggjarstøðu.
- Fíggjarframar til at bøta um tilfeingisumsiting.
- Hættir til at meta um, hvussu væl ið nýggj tøkni fer við umhvørvinum.

Fátækralondum tørvar meiri vísindafólk at granska og geva tilmæli um menning og umhvørvi. Umráðandi er hjá hesum londum at hava nóg mikið av skikkaðum vísindafólki, so at tey fáa samráðst á jøvnum føti við ídnaðarlond um umhvørvis- og menningarmál.

## 7.4 Útbúgving og alment tilvit

Mong av okkum skilja ikki tað tætta samband, sum er millum virksemi okkara og umhvørvið - fyrst og fremst, tí at vit eru ikki nóg væl kunnað um tað.

Neyðugt er tí at økja um bæði tilvit og áhuga okkara fyri, hvussu umráðandi tað er at loysa umhvørvis- og menningartrupulleikar.

Útbúgving kann stimbra umhvørvisliga og etiska tilvit okkara, hugburð, atburð, virði og hegni. Alt hetta er neyðugt fyri burðardyggu menningina.

Tí eigur útbúgvingin ikki einans at snúgva seg um sjálvt umhvørvið og tað lív, ið har býr. Hon eigur eisini at snúgva seg um, tað sosiala og fíggjarliga umhvørvið og okkara egna menning.

Grundskúlin er støðið undir øðrum útbúgvingum í menning og umhvørvi. Øll lond eiga at stremba eftir, at øll fáa høvi at útbúgva seg, og at minst 80% av øllum gentum og dreingjum fáa formligan ella óformligan grundskúla.




Analfabetisma hjá vaksnum eigur at verða minkað niður í minst helvtina av tí, sum hon

var í 1990-unum. Analfabetisma hjá kvinnum eigur ikki at vera størri enn hjá monnum.

Fyri at betra um útbúgvingarmøguleikarnar eiga londini at:

- Geva øllum høvi at útbúgva seg í menning og umhvørvi.
- Arbeiða umhvørvis-, menningar- og fólkatalshugtøk og ávumetingar[25] inn í allar útbúgvingar. Serligur dentur eigur at verða lagdur á at útbúgva avgerðartakararnar.
- Lata skúlabørn vera við í økisumhvørviskanningum av t.d. føði, drekkivatni, reinførisviðurskiftum, og hvussu tilfeingisnýtsla ávirkar umhvørvi og búskap.

Heiminum tørvar eina arbeiðsmegi, sum kann og dugir at laga seg til vaksandi umhvørvis- og menningartrupulleikar og til tær broytingar, sum koma í skiftinum til eitt burðardyggt samfelag.

Øll lond eiga at:

- Fáa í lag frálæruskráir fyri útbúgvin fólk til at stuðla teimum at fáa burðadygg størv.
- Eggja øllum samfelagsøkjum til at útbúgva fólk í umhvørvisumsiting. Ímillum hesi øki eru ídnaður, fróðskaparsetur, myndugleikar og sjálvbodnir felagsskapir
- Lata lokalar umhvørvistøkningar veita økissamfeløgum neyðugan kunnleika, tá ið tey fara undir grundleggjandi umhvørvisvernd.
- Samstarva við fjølmiðlar, lýsingafyritøkur, sjónleikarar og undirhaldarar um at skunda undir eitt betri alment kjak um umhvørvismál.
- Arbeiða royndir og fatanir hjá upprunafólki av burðardyggari menning inn í útbúgvingina.

[25] metingar av, hví eitthvørt virksemi ella fyribrigdi ávirkar viðurskifti uttan um seg

## 7.5 Grundarlagið undir burðardyggari menning

Førleikin hjá einum landi at skapa burðardygga menning valdast evnini hjá fólki og stovnum at skilja torfør umhvørvis- og menningarmál, so gjørligt er at velja rætta menningarleið.

Fólki nýtist kunnleika fyri at síggja møguleikar og mørk í umhvørvinum. Fólk fer at skula taka støðu til torfør, politisk mál sum t.d. veðurlagsbroytingar og lívfjølbroytnisvernd. Til tess krevst vísindaligur, tøkniligur og fyriskipanarligur førleiki – umframt hegni á øðrum økjum við. Stjórnir eiga at skipa fyri breiðum, almennum hoyringum, so at tær kunnu meta um, hvørja vitan ið fólkinum tørvar, til tess at Agenda 21 kann verða framd í ymsu londunum.

Kunnleikauppbygging er umráðandi, tá ið farið verður at fyrireika landsætlanir um burðardygga menning. Lond kunnu byggja á tær royndir, sum tey fingu av at fyrireika landsfrágreiðingar til Rioráðstevnuna, og á royndir av verandi varðveitingarætlanum um menning og umhvørvi.

Fátækralondum fer at tørva meiri samstarv og hjálp til at gera raðfestingar, so at tey fáa savnað seg um broytingar frammi í tíðini og ikki bara um verandi trupulleikar. Til dømis nýtist bæði stjórnum og vinnulívi at vita, hvussu ein longu tíðliga í ráðleggingini kann meta um tey árin, ið menningarætlanir kunnu hava á umhvørvið. Teir stovnar, myndugleikar og felagsskapir, ið kunnu hjálpa til við útbúgving og kunnleika - ikki minst tøkniligum - eru ST, stjórnir, kommunur, fróðskaparsetur, granskingardeplar, vinnulív, sjálvbodnir felagsskapir og onnur privat feløg. Menningarverkætlanin hjá ST hevur fingið í lut at skipa fyri altjóða fíggjarstuðli og at samskipa ætlanir um kunnleikauppbygging.

## 7.6 Fyriskipan av burðardyggari menning

Høvuðsábyrgdina av at uppfylgja tilmælunum frá Rioráðstevnuni hevur aðalfundurin hjá ST, har øll limalond hava eina politiska skyldu at røkja.

ST-skipanin hevur ein stóran leiklut, og tørvur verður bæði á at umskipa og at kveikja nýtt lív í búskaparlig og sosial øki fyri at fremja Agendu 21.

Á Rioráðstevnuni varð heitt á ST um at skipa nevndina fyri burðardygga menning, CSD[26], har øll lond skulu vera limir. Nevndin skal í arbeiði sínum nýta serkunnleikan hjá ST-felagsskapum, altjóða fíggjarstovnum, sjálvbodnum felagsskapum, vinnulívi og gransking. Nevndin skal fylgja við arbeiðinum at útinna Agendu 21, og hon skal gera tilmæli til ST.

Á Rioráðstevnuni varð eisini heitt á ST-aðalskrivaran um at tilnevna eina ráðgevandi nevnd við umhvørvis- og menningarserfrøðingum.

Umhvørvisstovnurin hjá ST (UNEP) má menna og stuðla tilfeingisroknskap og umhvørvisbúskap. Stovnurin má eisini betra um umhvørviseftirlitið við ávaringarskipanum, sum skjótt kunnu boða frá, um umhvørvisvandar stinga seg upp. Harafturat má stovnurin gera altjóða umhvørvislógir og umhvørvisáttmálar. Hann kann eisini geva stjórnum ráð um, hvussu tær kunnu byggja umhvørvisfyrilit inn í menningarpolitikk og menningarætlanir.

Menningarstovnurin hjá ST (UNDP) fer við sínum heimsnetverki at virka sum stuðulsfyriskipari. Hann fer eisini at hava ST-stuðulin um henda, at byggja upp serkunnleika um burðardygga menning.

[26] United Nations Commision on Sustainable Development

Skal Agenda 21 gerast veruleiki, mugu sjálvbodnir felagsskapir, granskarar, vinnulív, lokal feløg og onnur halda á við sínum virkna og góða arbeiði.

## 7.7 Altjóða lóggáva

Altjóða lóggáva um burðardygga menning má verða skipað soleiðis, at hon hevur fyrilit fyri tí viðkvæma mótinum millum menningartørv og umhvørvisvernd.

Verandi umhvørvislóggáva eigur at verða endurskoðað, so at hon munar betur. Altjóða lógir eiga eisini at stuðla upp undir umhvørvis- og menningarpolitikk. Trætur um ósamsvar millum umhvørvisavtalur og sosialar ella búskaparligar avtalur eiga at verða loystar.

Høvuðsmálini við altjóða lóggávu um burðardygga menning eiga at vera at:

- Gera felagsavtalur, sum skapa munagóð, altjóða krøv um umhvørvisvernd. Samstundis eigur at verða havt í huga, at lond kunnu vera ólíka fyri og hava ólíkar møguleikar.
- Meta um líkindini fyri at áseta felags rættindi og skyldur hjá londum í sambandi við burðardygga menning.
- Forða fyri ella loysa altjóða trætur um burðardygga menning. Hetta gerst á ymsan hátt, frá at fáa ósamdar partar at tosa saman, til at leggja trætumál fyri altjóðadómstólin í Haag.

Tað er umráðandi, at øll lond eru við í arbeiðinum at gera altjóðasáttmálar um burðardygga menning. Nógvar av verandi umhvørvisavtalum eru gjørdar, uttan at fátækralond eru sloppin reiðiliga upp í part. Tí er neyðugt at endurskoða hesar avtalur, so at tær endurspegla ynski hjá fátækralondum.

Tá ið altjóða umhvørviskrøv verða sett, eigur at verða givið gætur, at lond kunnu vera ymiskt fyri og hava ólíkar umstøður at lúka altjóða umhvørvisavtalur.

Í umhvørvisætlanum eigur dentur at verða lagdur á grundleggjandi orsøkir til umhvørvistýning, og ansað eigur at verða

eftir, at altjóða handil verður ikki hindraður óneyðugt.

Fátækralond eiga at verða stuðlað í royndum sínum at halda altjóða avtalur. Tey eiga eisini at verða stuðlað til at vera við í samráðingum um nýggjar ella endurskoðaðar avtalur. Stuðlað eigur at verða bæði við peningi og við hjálp til at byggja upp serkunnleika um altjóða lóggávu og burðardygga menning. Neyðugt er eisini at lata fátækralondum tær upplýsingar og tann vísindaliga og tókniliga kunnleika, sum krevjast, um tey skulu vera við í altjóða, lógarfestum avtalum.

## 7.8 Upplýsing til avgerðartakarar

Stórar mongdir av upplýsingum er longu tøkar at nýta hjá teimum, sum umsita burðardygga menning, men ofta er ilt at finna rættar upplýsingar í røttu løtu.

Mangastaðni verða upplýsingar ikki rætt umsitnar. Hetta kemst fyrst og fremst av vantandi tøkni og vantandi serkunnleika. Fólk sær heldur ikki altíð, hvussu virðismiklar vælskipaðar upplýsingar eru, og mangan fara onnur átrokandi mál við nógvari arbeiðsorku. Hetta er serstakliga galdandi í fátækralondum, og munurin millum fátækralond og ídnaðarlond bara økist, tá ið talan er um at hava nógvar, góðar og atkomuligar upplýsingar.

Upplýsingar um burðardygga menning mugu verða latnar røttum fólki - í rættari tíð - og tær skulu vera lættar at skilja. Lond eiga at tryggja sær, at økissamfeløg og brúkarar fáa tær upplýsingar og tey amboð, sum teimum tørvar til at umsita umhvørvi og tilfeingi burðardygt. Neyðugt kann eisini verða at nýta siðabundna vitan, ikki minst ta hjá upprunafólki.

Lond og altjóða felagsskapir eiga at útvega neyðugar upplýsingar um umhvørvi, tilfeingi og menning. Tær skulu vera lættskiljandi, so at øll kunnu umsita burðardygga menning.

Fólkinum tørvar:

- Fleiri upplýsingar um býarluft, drekkivatn, jarðartilfeingi, oyðimarkarvøkstur, lívfjølbroytni, skóg, sjógv og lofthav.
- Betri upplýsingar um heilsu, fátækt, fólkatalsviðurskifti og tilfeingisrættindi. Tørvur er á upplýsingum um, hvussu ymsir samfelagsbólkar, t.d. upprunafólk, menningartarnað, kvinnur, ung og børn síggja samfelagsmál.

Tað má gerast lættari at gera ávísar fyri burðardygga menning. Teir kunnu síðan verða innarbeiddir í ymsar landsfrágreiðingar, t.d. búskaparfrágreiðingar. Styrkt eigur at verða munandi um ST-skipanir at hava eftirlit við umhvørvisstøðuni og fíggjaligu menningini. Er talan um dýrar og framkomnar upplýsingaskipanir, t.d. um fylgisvein, nýtist fátækralondum hjálp at fáa til vegar rætta tøkni og at nýta hana. Upplýsingar hjá fyritøkum eiga eisini at verða nýttar. Í summum førum verður tó neyðugt at lata fátækralondum fíggjarligan stuðul og fáa atgongd til tilfar, ið er til skjals.

## 7.9 Rio-yvirlýsingin um menning og umhvørvi

Á Rioráðstevnuni vórðu samtyktar aðalreglur, sum skulu vísa á leiðina til framtíðar menning. Hesar aðalreglur greina rættindi okkara til menning, samstundis sum tær greina ta ábyrgd, ið liggur á okkum at verja felags umhvørvi. Aðalreglurnar byggja á tankar í umhvørvisyvirlýsingini, ið varð samtykt í Stokkhólmi í 1972.

Rio-yvirlýsingin staðfestir, at skulu vit hava eina búskaparmenning, sum munar, so eru einastu ráðini at samskipa hana við umhvørvisvernd. Hetta gerst bara, um lond fáa skapt eitt nýtt og javnbjóðis samstarv um allan heim - eitt samstarv, har bæði tjóðir, stjórnir og umráðandi samfelagsøki eru við.

Rio-aðalreglurnar siga, at:

- Øll hava rætt til eitt sunt og virkið lív í samljóði við umhvørvið.
- Menningin í dag má ikki forkoma møguleikum okkara ella eftirkomarum okkara at nøkta menningarligan og vistligan tørv.
- Lond hava sjálvstøðugan rætt at gagnnýta egið tilfeingi, tó at tað ikki skal skaða umhvørvi hjá øðrum landi.
- Lond skulu gera altjóða lógir, ið tryggja, at endurgjald verður latið fyri skaða, ið virksemi í einum landi ger á umhvørvi í øðrum landi, um so er, at virksemið er undir myndugleika eftirliti.
- Lond skulu nýta fyrivarnisregluna fyri at verja umhvørvið. Tað merkir, at vísindalig óvissa skal ikki verða nýtt sum orsøk til at útseta fyribyrgjandi tiltak.
- Skulu vit fáa burðardygga menning, má umhvørvisvernd vera fastur partur av henni.
- Fyri at nøkta tørvin hjá meginfjøldini, er neyðugt at lúka burtur fátækt og at javna lívskorini um allan heim.

- Lond skulu samstarva um at varðveita og endurbyggja heimsins vistskipanir. Ídnaðarlond ásanna, at tey hava eina serliga ábyrgd í altjóða stríðnum fyri burðardyggari menning. Hetta, tí at tey leggja mesta trýstið á heimsumhvørvið, vegna tilfeingis- og fíggjarorku.
- Lond eiga at skerja og fáa burtur óráðiliga framleiðslu og nýtslu, og tey eiga at stuðla einum hóskandi fólkatalspolitikki.
- Besti vegur at greiða umhvørvismál er samstarv millum fólk og myndugleikar. Lond skulu tí eggja fólki sínum til hetta samstarv, við at lata upplýsingar um umhvørvið vera atkomuligar hjá øllum.
- Lond skulu samtykkja munagóðar umhvørvislógir og lóggávur um endurgjald til teirra, sum eru fyri dálking ella øðrum umhvørvisskaða. Hava lond myndugleika til tess, skulu tey meta um tær umhvørvisfylgjur, ið eitthvørt váðiligt virksemi kann hava við sær.
- Lond eiga at samstarva um at stuðla eini opnari heimsskipan fyri fíggjarvøkstri og burðardyggari menning. Umhvørvispolitikkur má ikki verða havdur sum órímiligt vápn at forða altjóða handli.
- Tann, sum dálkar, skal rinda fyri upptakið.
- Lond skulu varskógva hvørt annað um umhvørvisvanlukkur ella aðrar skaðatilburðir, sum kunnu røkka um landamørk.
- Burðardygg menning krevur betri vísindavitan. Til tess eiga lond at geva hvørt øðrum atgongd til kunnleika og nýggja tøkni.
- Tað er umráðandi, at kvinnur eru við í arbeiðinum fyri burðardyggari menning. Tað er umráðandi við skapanarhugi, hugsjónum og djarvleika hjá ungdómi. Tað er umráðandi við kunnleika hjá upprunafólki, og lond eiga at stimbra tess mentan og áhugamál.
- Kríggj er niðurbrótandi fyri burðardyggari menning. Lond skulu virða altjóða umhvørvislógir í vápnastríði.
- Friður, menning og umhvørvisvernd eru eitt og skiljast ikki sundur.

## 7.10 Rio-yvirlýsingin um skógarvinnu

Á Rioráðstevnuni vórðu gjørdar aðalreglur fyri burðardygga skógarvinnu. Henda fyrsta semja um tann stóra týdning, ið skógur hevur, viðgerð bæði tørvin hjá fólki at verja skógin av mentanarligum og umhvørvisligum ávum, og tørvin at nýta skógartilfeingi til at mennast búskaparliga. Yvirlýsingin er støði undir seinni samráðingum um eina bindandi avtalu.

Yvirlýsingin sigur, at skógurin við sínum torgreiddu, vistligu mannagongdum, hevur stóran týdning fyri búskaparliga menning og lívfjølbroytni. Skógurin gevur okkum mat, við, og heiligvág, og hann yður í lívi, sum í mongum føri enn er ókannað. Skógurin bindur eisini at sær nógv vatn og kol, ið annars hevði farið út í lofthavið sum koltvíilti sum hevði økt um vakstrarhúsárinið. Skógurin lívir eisini mongum villini dýrum og plantum, og hann hevur stóran mentanarligan og andligan týdning fyri fólk.

Aðalreglurnar í yvirlýsingini siga, at:

- Øll lond eiga at taka lut í at lívga um heimin við at gróðurseta trø og varðveita skóg.
- Lond hava rætt til at nýta skóg sín til sosiala og búskaparliga menning. Nýtslan eigur tó at verða grundað á ein landspolitikk fyri burðardygga menning.
- Burðardygg skógarvinna krevur ráðiliga nýtslu og framleiðslu um allan heim.
- Skógur eigur at verða umsitin soleiðis, at hann nøktar sosialan, fíggjarligan, vistligan, mentanarligan og andligan tørv hjá okkum sjálvum og eftirkomarum okkara.
- Ágóðin av skógarvørum og ílegutilfeingi eigur at verða býttur millum framleiðara og tey lond, sum eiga skógin. Býtið eigur at vera eftir avráddum felagstreytum.
- Plantuskógur gevur ídnaðinum umhvørvisvinarliga orku og umhvørvisgott tilfeingi. Brenniviður er serliga týðandi fyri fátækralond. Hesin tørvur eigur at verða nøktaður við burðardyggari skógarvinnu. Gróðurseting gevur t.d. fólki arbeiði og minkar um tørvin at høgga gamlan skóg.
- Landsætlanir eiga at verða gjørdar fyri at verja serlig sløg av skógum. Hetta kann vera gamal skógur ella slíkur, sum hevur mentanarligan, søguligan ella andligan týdning fyri fólk.
- Altjóða peningastuðul eigur at verða veittur fátækralondum og vinnulívi teirra fyri at hjálpa teimum at varðveita skógirnar.
- Londunum nýtist ætlanir um góða skógarumsiting. Ætlanirnar skulu eisini fevna um øki, ið liggja upp at skógum.
- Ætlanir um skógarvinnu eiga at fevna um bæði fíggjarlig og ikki-fíggjarlig virði. Mett eigur eisini at verða um fyrimunir og vansar við antin at høgga ella at varðveita skóg. Politikkur, ið elvur til oyðulegging av skógum, eigur ikki at verða førdur.
- Skógarbúgvar, upprunafólk, kvinnur, vinnulív og privatir felagsskapir eiga at verða við til at leggja til rættis og útinna skógarvinnupolitikk í einstøku londunum.
- Skógarvinnupolitikkur eigur at stimbra samleika, mentan og rættindi hjá upprunafólki og skógarbúgvum. Hegni teirra at nýta skógin burðardyggt eigur at verða virt og gagnnýtt, tá ið skógarpolitikkur verður settur út í kortið. Tey eiga at fáa lønandi arbeiði og ognarrætt til jørð sína, so at tey verða eggjað til at nýta skógin burðardyggt og kunnu vinna sær til lívsins uppihald.
- Handil við skógarvørum eigur at verða grundaður á virðiligar reglur, sum londini avtala sínámillum. Einvegis

forðingar eiga ikki at verða nýttar til at forða altjóða handli við skógarvørum.

- Handilsmekanismur eiga at eggja til, at vørur verða góðskaðar á staðnum, og at betri prísur fæst fyri tær. Tollur og aðrar handilsforðingar á slíkum vørum eiga at verða minkaðar ella avtiknar.
- Eftirlit eigur at verða havt við dálkingarkeldum, t.d. sýruregn, sum er til meinboga fyri skógin.

## 7.11 Millumtjóða veðurlagssáttmálin

Virksemi okkara hevur við sær stór útlát av veðurlagsgassum, teirra millum koltvíiltu, sum økir natúrliga vakstrarhúsárinið í lofthavinum.

Fryktandi er fyri, at fara gassmongdirnar at økjast, so hitast jørð og lofthav upp aftur meira, og hetta fer at ávirka vistskipanir stórliga.

Summi øki eru serliga viðkvæm. Hetta eru lágar oyggjar og strendur, øki, sum eru viðbrekin fyri vatnflóð, øki, sum eru fyri turki og oyðimarkarvøkstri, umframt summi fjallaøki.

Lond eiga at verja veðurlagsskipanir til gagns fyri okkum sjálvi og eftirkomarar okkara. ST heimilar londum at gagnnýta egið tilfeingi, men tað liggur eisini á teimum at tryggja, at virksemi skaðar ikki umhvørvi í øðrum londum.

At veðurlagið broytist um allan heim hevur við sær, at øll lond mugu samstarva væl. Tey mugu vera við í altjóða arbeiðinum fyri einum munagóðum og hóskandi átaki at steðga gongdini. Tey eiga at samtykkja eina munagóða umhvørvislóggávu, so at eftirlit hevst við vakstrarhúsgassútláti, og so at til ber at tryggja tær natúrligu tilgongdir, sum bróta niður summi av gassunum.

Aðalmálið við veðurlagssáttmálanum er at minka so mikið um vakstrarhúsgassini, at heimsveðurlagið ikki broytist munandi. Tó er at fara hóvliga fram, so at vistskipanir fáa lagað seg til veðurlagsbroytingarnar. Matvøruframleiðslan má heldur ikki minka, og rúm má vera fyri burðardyggari búskaparmenning.

Størstu útlátini av vakstrarhúsgassi stava frá ídnaðarlondum. Tí eiga hesi lond at ganga undan í stríðnum móti veðurlagsbroytingum

og teimum skaðiligu árinum, tær kunnu elva til.

Ídnaðarlond og tey, sum eru í eini búskaparligari skiftistíð, t.d. eystanlond, skulu gera hvør sína virkisætlan og taka stig til at minka um útlátini av vakstrarhúsgassi. Tey skulu eisini verja skóg og sjógv, ið binda nógv vakstrarhúsgass at sær.

Málið hjá hesum londum er at skerja útlátini av koltvíiltu og øðrum vakstrarhúsgassum, so at tær verða tær somu sum í 1990. (Útlát av øðrum gassum, t.d. teimum, ið bróta niður osonlagið, hoyra til Montrealavtaluna).

Útlátið av vakstrarhúsgassi fyri hvønn íbúgva er lítil í fátækralondum. Hjá hesum londum ræður mest um at skapa búskaparliga og sosiala menning – og at fáa bilbugt við fátæktini. Men so hvørt, sum búskapur og orkunýtsla teirra vaksa, fara útlátini av vakstrarhúsgassum at økjast samsvarandi.

Summi av tiltøkunum, ið mótvirka veðurlagsbroytingum kunnu fremjast við lítlari fíggjarligari orku og eru eisini við til at loysa aðrar umhvørvistrupulleikar. Men summi lond, serliga fátækralond, hvørs búskapur er treytaður av fossilum orkukeldum, kunnu hava sera ilt við at leggja um til slíkar orkukeldur.

Enn er stór óvissa um, nær og hvussu veðurlagsbroytingarnar fara at gera um seg, og hvussu stór árinini fara at verða. Har ið vandi er fyri álvarsomum ella óbótaligum skaða, skal vísindalig óvissa ikki verða nýtt sum orsøk til at útseta fyribyrgjandi tiltøk.

Ídnaðarlond eiga at stuðla fátækralondum at lúka krøvini í veðurlagssáttmálanum, og tey eiga at hjálpa teimum at verja seg ímóti teimum árinum, ið veðurlagsbroytingar kunnu elva til. Hetta gerst við at:

- Veita teimum pening og tøkniliga hjálp, so tey fáa havt eftirlit við útláti av vakstrarhúsgassi.
- Veita teimum umhvørvisvinarliga tøkni og kunnleika, og stuðla teimum at menna tøkni sjálvi.
- Veita teimum londum, ið eru serliga viðkvæm fyri veðurlagsbroytingum, peningaligan stuðul, so tey fáa lagað seg til broytingarnar.

Øll lond skulu:

- Útvega sær vitan um, hvussu stórt útlát av vakstrarhúsgassum, tey hava, og hvussu nógva koltvíiltu, ið sjógvur ella skógir teirra binda at sær.
- Almannakunngera dagførdar upplýsingar um ætlanir fyri útlátseftirliti, og hvørji stig eru tikin til at laga samfelagið til veðurlagsbroytingar.
- Stuðla burðardyggari umsiting av natúrligum vakstrarhúsgassgoymslum, (sum t.d. sjógvi og skógi).
- Samstarva við onnur lond um at verja strendur, vatntilfeingi og landbúnað fyri árinum frá veðurlagsbroytingum.
- Samstarva við onnur lond um at verja øki, sum eru hótt av vatnflóð ella turki, serliga í Afrika.
- Kunna almenningin um veðurlagsbroytingar og tey árin, tær elva til, og stuðla honum at vera við til at áseta tiltøk ímóti broytingunum.

Hóast neyðugt er at stríðast ímóti veðurlagsbroytingum, eiga londini eisini at stuðla eini altjóða búskaparskipan, sum førir til varandi búskaparvøkstur og menning í øllum londum, serliga fátækralondum. Hetta fer at lætta um hjá teimum at greiða teir vansar, ið kunnu standast av veðurlagsbroytingum. Tiltøk ímóti veðurlagsbroytingum eiga ikki at verða nýtt sum tilvildarligar forðingar fyri altjóða handli.

Í sambandi við henda sáttmála verður settur ein serligur bólkur, ið skal hjálpa til við at veita londum pening og tøkni, so at tey fáa havt eftirlit við vakstrarhúsgassi, og fáa lagað seg til veðurlagsbroytingar. Í bólkinum eru Altjóða umhvørvisgrunnurin, GEF, Menningarstovnurin hjá ST, Umhvørvisstovnurin hjá ST og Altjóðabankin fyri endurbygging og búskaparvøkstur, (IBRD[27]). Hesin banki er partur av Heimsbankanum.

[27] The International Bank for Reconstruction and Development

## 7.12 Millumtjóða sáttmálin um lívfjølbroytni

Lívfjølbroytni - tað, at nógv ymiskt lív er í náttúruni - er virðismikið á so mangan hátt, bæði av vistligum, arvaligum, sosialum, búskaparligum, vísindaligum, útbúgvingarligum, mentanarligum, heilsuligum og estetiskum ávum.

Lívfjølbroytni er umráðandi fyri menningina og fyri at kunna varðveita burðardyggar skipanir í lívhválvinum. Fyri at nøkta tann alsamt vaksandi tørvin, ið vit hava á mati, góðari heilsu og øðrum neyðturvileikum, ræður um hjá okkum at varðveita og nýta lívfjølbroytnið rætt.

Lívfjølbroytnið er munandi minkað av virksemi okkara, og nú er at steðga hesi gongdini. Stórar íløgur skulu til fyri at varðveita tað, men íløgurnar fara eisini at kasta av sær á mangan hátt, bæði umhvørvisliga, búskaparliga og sosialt.

Heimurin má varðveita lívfjølbroytnið og nýta tilfeingið burðardygt. Tað merkir, at vit nýta lívfjølbroytnið soleiðis, at tað ikki minkar. Tá fær tað betur nøktað tørv og ynski hjá okkum sjálvum og hjá eftirkomarum okkara. Nýtslan fevnir eisini um ílegutilfeingið, ið er nøgdin av arvaeginleikum í umhvørvinum. Vit mugu somuleiðis verja vistskipanirnar, ið eru ein eind av livandi og deyðum tilfeingi.

Hvørt land hevur rætt til sítt lívtilfeingi, men skal nýta tað rætt og varða um lívfjølbroytnið.

Londini, ið skriva undir sáttmálan, skulu:

- Eyðmerkja teir lívfjølbroytnispartar, ið eru umráðandi fyri burðardygga nýtslu og varðveitsla og hava eftirlit við virksemi, ið kann verða hesum til ampa.
- Gera ymsar landsætlanir fyri at varðveita og nýta lívfjølbroytni rætt.

- Síggja til, at varðveitsla og nýtsla av lívfjølbroytni eru partar av politisku ráðleggingar- og avgerðargongdini.
- Nýta fjølmiðlar og skúlar til at gera fólk varugt við týdningin av lívfjølbroytni, og hvussu neyðugt tað er at verja tað.
- Friðað ávís øki fyri at stuðla burðardyggari menning av økjunum í nánd og samtykkja lógir, ið skulu verja hóttar plantu- og djórastovnar.
- Endurbyggja týndar vistskipanir og hóttar plantu- og djórastovnar og hjálpa heimafólki at gera og útinna hesi tiltøk.
- Gera mannagongdir til at hava eftirlit við teimum vansum, ið kunnu standast av íleguviðgerð[28].
- Gera almennar umhvørvisfylgjumetingar av verkætlanum, sum kunnu skaða lívfjølbroytnið.
- Forða fyri innflutningi av fremmandum plantum og dýrum, sum eru til ampa fyri vistskipanir, búøki ella aðrar plantur og onnur dýr. Hava eftirlit við ella avoyða slíkar plantur og slík dýr, um tey verða innflutt.




[28] tað at broyta ílegur í livandi veru fyri at bøta um einhvønn eginleika hennara.

Mong upprunafólk og økissamfeløg eru sera bundin av lívtilfeingi. Lond eiga tí at nýta kunnleikan teirra at verja og gagnnýta tilfeingið burðardygt. Lond eiga at varðveita lokalan og siðbundnan kunnleika og eggja fólki til at nýta hann víðari. Hetta eigur at verða gjørt í bestu semju við tey, sum eiga kunnleikan, og tey eiga at fáa vinning av, at arbeiðshættir teirra verða nýttir.

Sáttmálin sigur, at:

- Londini skulu betra um møguleikarnar fyri umhvørvisvinarligari nýtslu av innlendis ílegutilfeingi. Hetta skal verða gjørt við tí í hyggju, at teir granskingarligu, menningarligu og fíggjarligu ágóðar, sum hetta tilfeingi onkursvegna hevur við sær, skulu koma øllum til góðar á rættvísan hátt.
- Fátækralond skulu hava atgongd til umhvørvisvinarliga tøkni, so at tey kunnu nýta og varðveita lívfjølbroytnið burðardygt. Henda atgongd skal verða grundað á lagaligar og rættvísar treytir. Einkarrættur skal verða virdur.
- Fátækralond mugu fáa atgongd til tøkni, so at tey fáa gagnnýtt tað tilfeingi, ið tey hava fingið til vega.
- Fátækralond skulu fáa tøkniliga og vísindaliga hjálp til at menna egnar stovnar og egna vitan um burðardygga lívfjølbroytnisnýtslu.
- Londini skulu umhugsa tørvin á eini avtalu um trygga viðgerð og nýtslu av verum, ið eru viðgjørdar við lívtøkni.
- Tey ídnaðarlond, sum skriva undir henda sáttmála, skulu veita fátækralondum nýggjan peningastuðul til tess at hjálpa teimum at seta sáttmálan í verk. Fyrstu tíðina fara teir tríggir ST-felagsskapirnir, sum arbeiða við menning og umhvørvi, at hava stuðulin um hendi.

Sáttmálin fær gildi, tá ið 30 lond hava samtykt hann.

# 8. AFTANÁ RIO

Um miðan juni 1992 var ein eldri maður úr Canada á eini brasilskari ráðstevnu. Hann áminti heimin soleiðis: *"Um vit fara at nevna hesa Ráðstevnu eina succes ella ikki er fult og heilt treytað av verkunum, sum fara í gongd aftaná stevnuna".*

Maðurin æt Maurice Strong, staðið var Rio de Janero og høvið var endin av FN Ráðstevnuni um Umhvørvi og Menning. Maurice Strong var aðalskrivari á ráðstevnuni og við hesi viðmerking setti hann fingurin á eitt eymt punkt hjá øllum londum ið luttóku: *"Góðviljin at fremja tær føgru ætlanirnar frá ráðstevnuni tá gerandisdagurin fór at koma".*

Dagin fyri hevði Strong sitið á fundi saman við ikki færri enn 112 stjørnarleiðarum frá øllum heiminum. Í nógv ár frammundan ráðstevnuna vóru samráðingar farnar framm millum stjørnarumboð og ráðharrar, og eitt ótal av røðum vóru hildnar og samtyktir gjørdar. Røður, ið allar játtaðu ein góðvilja at luttaka í tí stórbæra endamálinum at bjarga framtíðini hjá heiminum.

Men orð eru takksom. Tá ið roknskapurin verður gjørdur upp, er tað verkið ið telur. Ongin hevði væntað, at so grundleggjandi samfelagsviðurskifti, sum vóru umrødd í Rio, verða broytt frá einum degi til annan. Men nú aftaná eigur ein menning hóast alt at kunna hómast. Ein burðardygg menning.

Men kann man so tað? Er heimurim á rættari kós? Eitt greitt svar finnst ikki. Ein rúgva er hent. Og púrt einki er hent. Samstundis. Ein rúgva - av tí diplomatiska er hent mangt og hvat. Og einki - av tí at lítið ítøkiligt higartil er komið burturúr.

Formliga samtykti Rio ráðstevnan fleiri yvirlýsingar, skjøl og sáttmálar. Tann týdningarmesti var Klima-sáttmálin, sum hevur til endamáls at verja jørðina ímóti vakstarhúsárini. Sambært sáttmálanum skulu i-londini minka útlátini av $CO_2$ og øðrum vakstarhúsgassum til støðið av útláti í 1990. Seinni er Klima-sáttmálin víðkaður við Kyoto-protokollini, ið ásetur prosent minkingar av útlátunum áðrenn 2010 í mun til útlátini í 1990.

*"Ráðstevnan hevur verið ein succes, men ikki eitt undur".* So greiður var aðalskrivarin í FN Kofi Annan, tá ið hann endaði heimsráðstevnuna um burðardygga menning í Johannesburg í 2002. Ráðstevnan í Johannesburg var ikki so framsíggin sum í Rio, men afturímóti var semja um at heimurin hevur brúk fyri virkni og ikki bara orðum. Fleiri av endamálsorðingunum frá Rio eru enn ikki útinnt og mótsett Rio var høvuðsevnið í Johannesburg íverkseting.

Fleiri ítøkulig og tíðarbundin endamál v.v. minking av fátækt, umhvørvi, náttúrutilfeingi og heilsa vóru samtykt. Eitt av teimum týdningarmestu var Millennium-endamálsorðingin, sum hevur til endamáls at minka um fólkatalið ið ikki hevur atgongd til reint drekkivatn, niður í eina helvt áðrenn 2015. Endamálsorðingin var á Ráðstevnuni økt til eisini at umfata atgongd til "basalan" sanitet. Á Ráðstevnuni vóru eisini endamálsorðingar samtyktar v.v. endurreising og skipan av fiskistovnum áðrenn 2015, við tí endamáli at tryggja burðardyggan fiskiskap. Eisini var samtykt at nýtsla og framleiðsla av kemikalium skal tryggjast áðrenn 2020, og at minka um missin av lívfjølbroytni. Kyoto-protokollin skal útinnast og nýtsla av varðandi orku skal økjast.

Fleiri ráð kunnu nýtast at fremja endamálorðingarnar í verki, m.a. Agenda 21

virkisætlanin. Á Ráðstevnuni varð dendur lagdur á frákobling av fíggjarligari menning og umhvørvisárinum. Tí varð eisini samtykt ein 10-ára ætlan fyri burðardygga framleiðslu og nýtslu. Dentur varð lagdur á, at fremja Agenda 21 virkisætlanina í verki og staðfesta, at neyðugt verður við politiskari støðutakan í øllum støðum, um burðadygga menningin skal fremjast í verki.

Í veruleikanum er tað hvørki vakstarhúsárinið, niðurbróting av osonlagnum, skógaroyðing ella mattrot til heimsins íbúgvar ið verða størstu avbjóðingarnar komandi árini. Tann størsta avbjóðingin er at útvega góðvilja og áræði. Góðvilja at broyta tann vanliga politiska og diplomatiska trekleikan. Áræði hjá politikarunum og fólki at leita sær nýggjar vegir.

# 9. DATA-KELDUR

| | |
|---|---|
| Permmynd | Global Challenge. UN. 2002 |
| Síða 6 | Human Development Report, UNDP, 2003 |
| Síða 7 | World Bank, 2003 |
| Síða 8 | World Bank, 2003 |
| Síða 9 | Living Plant Report, UNEP, 2002 |
| Síða 10 | EarthTrends, World Resources Institute (WRI), 2003<br>Living Planet Report, UNEP, 2002 |
| Síða 11 | Human Development Report, UNDP, 2003 |
| Síða 12 | World Bank, 2003<br>Human Development Report, UNDP, 2003 |
| Síða 13 | Human Development Report, UNDP, 2003<br>Human Development Report, UNDP, 2003 |
| Síða 16 | C.D. Keeling and T.P. Whorf, SIO, University of California, 2003<br>*http://cdiac.esd.ornl.gov* |
| Síða 17 | Marland, G., Boden, T.A. and R.J. Andres, 2002: Global, Regional and National $CO_2$ emissions.<br>*http://cdiac.esd.ornl.gov(k)* |
| Síða 19 | Food and Agriculture Organization of the United Nations, FAO, 2003<br>*http://www.fao.org* |
| Síða 22 | Living Planet Report, UNEP, 2002 |
| Síða 23 | Living Planet Report, UNEP, 2002 |
| Síða 25 | EarthTrends, World Resources Institute (WRI), 2003 |
| Síða 27 | EarthTrends, World Resources Institute (WRI), 2003 |
| Síða 30 | EarthTrends, World Resources Institute (WRI), 2003 |

Síða 31 United Nations System-Wide Earthwatch, UNEP, 2003
*http://www.un.org/earthwatch*

Síða 35 United Nations Development Fund for Women (UNIFEM), 2003
*http://www.unifem.undp.org/trustfund/*

Síða 36 Human Development Report, UNDP, 2003
*http://www.undp.org*

Síða 37 Human Development Report, UNDP, 2003
*http://www.undp.org*

World Bank, 2003

Síða 38 Ken Marston, 2002: Indigious demographics and the ageing population-threat or opportunity
*http://www.cotawa.asn.au*

Síða 43 Food and Agriculture Organization of the United Nations, FAO, 2003
*http://www.fao.org*

Síða 46 World Bank, 2003

Síða 49 Human Development Report, UNDP, 2003
*http://www.undp.org/*

Síða 59 EarthTrends, World Resources Institute (WRI), 2003.

# 10. ORÐALISTI

**avskógan** tað at skógur verður týndur av einhvørjum virksemi hjá fólki.
**áarblindni** smittusjúka, ið fer illa við húð og eygum. Vanlig í Afrika og í Suður-og Miðamerika.
**árinsmeting** meting av, hvussu eitthvørt virksemi ella fyribrigdi kann ávirka viðurskifti uttan um seg.
**ávísi** fyribrigdi, ið vísir á annað fyribrigdi.
**ávumeting** meting av, hví eitthvørt virksemi ella fyribrigdi ávirkar viðurskifti uttan um seg.
**bríkavelting** tað at velt verður í teigum, sum eru forskotnir hvør av øðrum í hædd.
**bruttotjóðarúrtøka** virðið á øllum vørum, tænastum og íløgum, sum eitt land ger, frátikið virðið á brúktum tilfeingi og á ríkisstudningi.
**burðaravmarking** tað at tálma fólkavøkstri við at skipa so fyri, at fólk fær sær ikki fleiri børn enn eitt ávíst.
**burðardyggur** sum hvílir í sjálvum sær, sum er á haldgóðum støði. Onnur orð, sum eru nýtt fyri tað sama, eru t.d. burðargóður, skynsamur, ráðiligur, ábyrgdarfullur, skilvísur, varandi, hóskandi, tryggur, góður og rættur.
**burðardygg menning.** búskaparlig menning og vøkstur, uttan at tað natúrliga tilfeingið versnar fyri komandi ættarlið.
**býarskipari** ein, ið ger býarskipanir.
**endurnýtsluskipan** skipan fyri, hvussu eitthvørt tilfar kann verða nýtt um aftur.
**eyðkvæmi** ólekjandi og deyðilig sjúka, elvd av HIV-virusi.
**fátækraland** land við lítlum ídnaði og veikum búskapi.
**fíggjarframi** fíggjarstuðul.
**forgeingiligur** sum verður uppi.
**fosfor** eiturkent, eldfimt frumevni (P).
**fyrivarnisregla** regla um, at vísindalig óvissa skal ikki verða nýtt sum orsøk til at útseta fyribyrgjandi tiltak.
**gagnnýta** fáa sum mest burtur úr einumhvørjum, nýta til fulnar.
**gitnaðarføri** evnini at nørast.
**gitnaðarkanning** kanning av, um kvinna er við barn.
**Gro Harlem Brundtland**
Fødd í 1939 í Noregi. Er útbúgvin lækni og hevur sitið á stórtingi í nógv ár fyri norska arbeiðara-flokkin. Gjørdist í 1981 fyrsti kvinnuligi forsætisráðharrin í landinum. Hevur eisini havt fleiri altjóða álitisstørv og er í løtuni fyriverandi aðalskrivari í Heimsheilsufelagsskapinum WHO.
**guineaormur** sníkur, ið kemur við drekkivatninum í kroppin, har hann síðan veksur og elvir svára pínu. Vanlig sjúka í Miðafrika.
**haldføri** tað at halda væl.
**halongass** føst, lívrunnin evnasambond, har serliga klor og brom eru ring fyri osonlagið. Halongass verða ofta nýtt í eldsløkkjariskipanum.
**heilsutøkni** medisinsk tøkni.
**heimafólk** lokalt fólk.

| | |
|---|---|
| **HIV** | HIV stendur fyri "Human Immunodeficiency Virus" og er smittandi virussjúka, ið oyðileggur immun-verjuna og elvir til eyðkvæmi. |
| **ídnaðarland** | land við fram-komnum ídnaði. |
| **ílega** | arvaeginleiki. |
| **ílegutilfeingi** | nøgd ella partnøgd av arvaeginleikum, sum eru í umhvørvinum. |
| **íleguviðgerð** | tað at broyta ílegur í livandi veru fyri at bøta um einhvønn eginleika hennara. |
| **kemikalia** | evni, ið fremur eina kemiska reaktión saman við einum øðrum evni. |
| **KFK-gass** | (KlorFluorKarbon) eru føst, lívrunnin evnasambond, ið eru ring fyri osonlagið. KFK-gass, ið eisini verða kallað freon, vórðu t.d. nýtt sum frostløgur í køliskápum, men eru nú mestsum forboðin at nýta í ídnaðarlondum. |
| **kolera** | brádlig, smittandi og sera vandamikil garnasjúka. Stendst ofta av skitnum drekkivatni og vánaligum reinføri. Vanligast í Asia, Suður- og Miðafrika og Suðuramerika. |
| **koltvíilti** | lit- og luktleyst luftslag. ($CO_2$). |
| **koppingarevni** | evni, ið latið verður inn í kroppin, so hann gerst mótstøðuførur móti smittandi sjúkum. |
| **køvievni** | lit- og luktleyst luftslag, ið er umráðandi føðsla hjá plantum. (N). |
| **landsfrágreiðing** | frágreiðing um einhvørji viðurskifti í einum landi. |
| **landsverkætlan** | verkætlan fyri eitt land. |
| **líð** | grasvaksin fjallsíða. |
| **lívfjølbroytni** | tað, at nógv ymiskt lív er í náttúruni. |
| **lívfjølbroytnismissur** | tað, at lívið í náttúruni verður minni fjølbroytt. |
| **lívfjølbroytnisvernd** | tað at verja lívfjølbroytni. |
| **lívhválv** | tann partur av jørðini, har ið lív trívst. |
| **lívrunnin** | ið stavar frá livandi verum. |
| **lívsýki** | magailska (við tunnum skarni), ið summar sjúkur hava við sær. |
| **lívtilfeingi** | nøgd ella partnøgd av tí lívi, sum finst í umhvørvinum. |
| **lívtøkni** | tað, at livandi verur verða nýttar í einhvørjari viðgerð ella framleiðslu. |
| **malaria** | ring tropusjúka, ið gevur nógvan fepur. Vanlig í Landsynningsasia, Suður- og Miðafrika og í Suður- og Miðamerika. |
| **mangrovuskógur** | skógarslag, ið veksur í vátlendi, sum er undir á flóð. |
| **meningitis** | bruni í heila- og mønuserki. |
| **menningargongd** | tað, hvussu menning lagar seg ella verður skipað. |
| **meslingar** | smittandi (barna)sjúka við fepri og útbrotum. |
| **Montrealavtalan** | altjóða avtala, sum varð gjørd í Montreal í 1987 um at minka nýtsluna av evnum, ið skaða osonlagið. Avtalan er síðan tillagað nakrar ferðir, seinast í 1999. |
| **oson** | súrevni við trimum atomum (O3). |
| **osonlag** | lag av osoni í lofthavinum, sum verjir fyri ultraviolettum sólargeislum. |
| **ovskipan** | tað, at hava ov nógv dýr á einum øki, so at ov lítil føði verður í part, og at økið kanska eisini fer illa. |
| **ovvelting** | tað at jørð verður ov nógv velt og tí fruktar minni. |
| **ósi** | stað, har ið á rennur í vatn ella sjógv. |
| **polio** | brádlig smittusjúka í mønu og heilarunni. Oyðileggur nervakyknur, ið stýra vøddunum, (barna-lamningur). |
| **rakjørð** | vánalig jørð. |

**reglugerð** reglur at ganga eftir, t.d. í sambandi við lógir.
**rættardømi** starvsøki hjá dómstóli.
**saltseting** tað, at salt setir inn í eitthvørt (og spillir tað).
**sankutøð** øll onnur tøð enn mykjutøð.
**skiftivelting** tað, at skift verður ímillum at velta ymsa grøði í somu jørð.
**spillvatn** skitið vatn (t.d. frárensl).
**spitalskusjúka** áhaldandi smittusjúka í húð, lívgøgnum og nervum.
**ST** ST stendur fyri Sameindu tjóðir. Felagsskapurin varð stovnaður 24. oktober 1945, og høvuðsmálini eru at arbeiða fyri friði og betri lívskorum um allan heim. Nú eru 189 lond limir í felagsskapinum.
**tilbúgvingarskipan** skipan, so ein er til reiðar við hjálp og útbúnaði, um vanlukka berst á.
**tilgongd** prosess.
**tilfeingi** nøgd av einhvørjum tilfari, ið er til taks.
**tuberklar** ring smittusjúka elvd av tuberklabakterium. Vanligast í Russlandi, Miðafrika og sumstaðni í Suðuramerika.
**týningarevni** ymisk eiturevni at drepa skaðadýr og ókrút við.
**tøkni** 1) maskinur og tílíkt 2) tað at nýta maskinur o.tíl. til at gera eitthvørt arbeiði.
**tøknifrøði** læran um tøkni.
**ultraviolettir sólargeislar** sólargeislar, sum í ov stórum mongdum kunnu elva til húðkrabba og eygnasjúkur.
**umhvørvi** tann náttúra ella tær umstøður, sum einhvør vera livir í.
**umhvørvisárinsmeting** meting av, hvussu eitthvørt virksemi kann ávirka umhvørvið.
**umhvørvisgóður** sum fer væl við umhvørvinum.
**úrsaltan** reinsa ella tøma fyri salt.
**útlát** 1) (skaðiligt) evni, sum á einhvønn hátt verður latið út í náttúruna. 2) sjálv hendingin.
**útlátstøkni** tøkni at fyribyrgja ella at minka um útlát.
**vakstarhúsárin** tað at lofthavið verður ovhitað av koltvíiltisútláti frá t.d. ídnaði.
**Veðurlag** veðurviðurskifti, ið stýra veðrinum í størri øki í ávísa tíð.
**vinnuverja** tað at verja vinnulívið móti kapping úr øðrum londum, t.d. við tolli.
**virkisføri** tað, at eitthvørt arbeiði munar væl og gevur úrslit.
**vistferðavinna** ferðavinna, ið leggur dent á øki, har ið fyrilit verður havt fyri umhvørvinum.
**vistfrøði** (læran um) sambandið millum livandi verur og umhvørvi teirra.
**vistførur** vistfrøðiliga burðardyggur.
**vistjavnvág** javnvág í vistskipan.
**vistligur** vistfrøðiligur.
**visttreyt** vistfrøðilig treyt.
**vitanarmissur** tað at fleiri útbúgvin fólk flyta úr einum samfelagi enn til sama samfelag.
**vætuskipan** natúrlig ella mekanisk skipan til at væta t.d. bø við.
**vørumerking** skrivlig lýsing av, hvørjum tilfari ein vøra er gjørd burturúr, og hvørji árin hon kann hava á heilsu og umhvørvi.
**økis-** lokalur. T.d. økisbú-skapur, økismyndugleiki, økissamfelag og økisskúli.
**CSD** United Nations Commision on Sustainable Development, (ST-nevndin fyri burðardygga menning)

| | |
|---|---|
| **FAO** | Food and Agriculture Organisation of the United Nations) (Altjóða vísindigrunnur) |
| **GEF** | Global Environment Facility, (Altjóða umhvørvisgrunnurin hjá ST) |
| **GEMS** | Global Environmental Monitoring System, (Eftirlits-skipanin fyri heimsumhvørvið) |
| **GRID** | Global Resource Information Database, (Upplýsingaskipanin fyri heimstilfeingið) |
| **IBRD** | The International Bank for Reconstruction and Development, (Altjóðabankin fyri endurbygging og búskaparvøkstur) |
| **IDA** | International Development Association, (Altjóða menningarfelagsskapurin) |
| **IULA** | International Union of Local Authorities, (Heimsfelagsskapurin fyri økismyndugleikar) |
| **UNCED** | United Nations Conference on Environment and Development, (Verkætlanin, ið stóð fyri Rioráðstevnuni) |
| **UNCHS** | United Nations Centre for Human Settlements, (ST-stovnurin fyri búseting) |
| **UNDP** | United Nations Development Programme, (Menningarstovnurin hjá ST) |
| **UNEP** | United Nations Environment Programme, (Umhvørvis-stovnurin hjá ST) |
| **UNIFEM** | United Nations Development Fund for Women |
| **WAMM** | World Association of the Major Metropolises, (Heimsfelagsskapurin fyri stórbýir) |
| **WCED** | World Commission on Environment and Development, (Heimsnevndin fyri menning og umhvørvi) |